Nr. 20 • Feb. 2014

# MIÐ & MAGN

Føroya Skipara- og Navigatørfelag & Maskinmeistarafelagið



**ÚTGEVARI**
Maskinmeistarafelagið og Føroya Skipara- og Navigatørfelag geva MIÐ & MAGN út í felag.
Blaðið verður sent limunum og teimum, sum tekna hald.
4 útgávur eru um árið.

**BLAÐNEVND**
Eyðstein Djurhuus, *ábyrgdarblaðstjóri*
Páll Hansen
Annfinn Garðalíð
Jóan Petur Patursson

**MASKINMEISTARAFELAGIÐ**
Grønlandsvegur 58
Postboks 3238
110 Tórshavn
Telefon 314718
Teldupostur: mf@mf.fo

**FØROYA SKIPARA- OG NAVIGATØRFELAG**
Jekaragøta 10
Postboks 248
110 Tórshavn
Telefon: 316973
Teldupostur: fsn@fsn.fo

**BLAÐHALD**
Tey, sum ynskja at halda MIÐ & MAGN, kunnu boða frá hesum í teldupost til:
info@midogmagn.fo
Haldara gjaldið er 200,- kr. um árið, tað er fyri 4 bløð.

**ENDURGEVING**
Tað er loyvt at endurgeva tekst úr MIÐ & MAGN, tá keldan verður upplýst.
MIÐ & MAGN kann heintast í PDF á heimasíðunum hjá feløgunum:
www.mf.fo
www.fsn.fo



**FORSÍÐUMYND**
Elias Zachariasen nevndarlimur í Skipara– og Navigatørfelagnum.

**PDF ÚTGÁVA**
Mið og Magn kann ókeypis heintast sum PDF á:
www.fsn.fo
www.mf.fo

**UMSITING**
Sp/f MEDIA
info@midogmagn.fo

**UMBRÓTING, PRENT OG LIÐUGTGERÐ**
Føroyaprent · www.foroyaprent.fo

Upplag: 1.800

# Vit heysta, sum vit sáa



*Eyðstein Djurhuus, ábyrgdar-blaðstjóri*

Tvær álvarsamar og syrgiligar vanlukkur eru hendar seinastu tíðina. Umborð á Christian Høy misti ein ungur bulgarskur sjómaður annað beinið í einum arbeiðsóhappi. Skipið er skrásett í Grønlandi, men verður rikið av reiðarínum Thor í Hósvík.

Vanlukkan hendi meðan skipið legði at bryggju í Hósvík. Vit kenna ikki umstøðurnar, men at leggja skip at bryggju er vandamikið arbeiði, og tí er umráðandi, at manningin hevur royndir og førleika til hetta. Tá minimun manningarskjal verður útskrivað er eitt av atlitinum, sum skulu takast, at manningin skal vera nóg stór og skikka til at leggja skipið trygt at bryggju.

FSN hevur spurt Sjóvinnustýrið um teir gera nakrar kanningar av útlendskum skipum, sum reka sítt virksemi úr føroyskari havn. Svarið varð sera løgið, nevniliga, at teir við núverandi raðfestingum hava frávalt at hava eftirlit við hesum skipum.

Garnaskipið Anita misti ein av manningini, tá teir fingust við at seta gørnini. Her var eisini talan um ein útlnendskan sjómann. Hesin var ættaður úr Indonesia. Manningin á Anitu telur 33 mans, til samanberingar kann nevnast, at eitt garnaskip við føroyskari manning hevur umleið 10 mans umborð. Stjórin á Sjóvinnustýrinum hevur eftir øllum at døma ongan skund at fáa kanna hesa syrgiligu vanlukku.

Tað hevur verið eitt langt og tógvið stríð hjá føroyska samfelagnum at upparbeiða eina góða og trygga fiski– og sjóvinnu. Okkara siglingarsøga er av merkt mongum skaðatilburðum og skipsvanlukkum. Tíbetur hevur tað gingið framá í trygdarhugburðinum í okkara vinnu. Hetta er ikki hent av sær sjálvum, men bert tí at allir partar hava víst ábyrgd og samfelagssinni, og hava arbeitt miðvíst við at bøta um trygdina á sjónum.

Tíverri mugu vit staðfesta, at nú gongur skeiva vegin aftur. Hetta er sjón fyri søgn. Tá vit ókritiskt loyva fremmandum skipum at virka í Føroyum, uttan nakað sum helst eftirlit, tá sigur úrslitið seg sjálvt. Loyva vit ørgrynnu av fiskimonnum úr láglønarlondum umborð á okkara skip, so fer tað at hava negativa ávirkan á trygdarstøðið. Tað er sera fáfongt at hugsa annað.

Tíverri mugu vit ásanna, at sjáldan verður nakað gjørt áðrenn vanlukkan er hend. Vónandi rakna okkara myndugleikar við nú, og gera okkurt munagott við hesi vandamál.

Eg havi álit á, at vit enn kunna koma aftur á rætta leið, men hetta krevur eina munandi kósbroyting.

*Vegna Mið og Magn*
*Eyðstein Djurhuus , ábyrgdarblaðstjóri*



4
Skiparar og navigatørar á aðalfundi



20
Nýggj frystilínuskip

## Innihaldsyvirlit

Vit heysta, sum vit sáa . . . . . 2
FSN Aðalfundur . . . . . 4
Arnbjørg á Høvdanum . . . . . 12
Brennidepilin: Elias Zachariasen . . . . . 16
Bókaumæli: Føroysk Skipasøga . . . . . 18
Klakkur og Eivind: Nýggj línuskip . . . . . 20
Heldur fryst enn flak . . . . . 22
Trolarakreppan . . . . . 23
Tíðindi frá Maskinmeistarafelagnum . . . . . 26
Tíðindi frá Skipara- og Navigatørfelagnum . . . . . 28
Føðingardagar hjá limum okkara . . . . . 30
Vinnuháskúlin: Prógvhandan . . . . . 32



23
Trolarakreppan



12
Møði kann elva til álvarsamar trupulleikar



32
Vinnuháskúlin: Prógvhandan

## Føroya Skipara– og Navigatørfelag:

# Aðalfundur 2013

Sambært viðtøkum felagsins, skal formaðurin leggja fram frágreiðing um virksemi felagsins farna árið. Hendan frágreiðing er løgd fyri nevndina innan aðalfundin.



*Eyðstein Djurhuus formaður og Annfinn Garðalíð næstformaður á aðalfundi.*

*Orð: Eyðstein Djurhuus, formaður*

2013 hevur verið merkt av nógvum og drúgvum sáttmálasamráðingum. Hetta hevur verið tíðarkrevjandi og strævið fyri nevnd og starvsfólk, aðrar uppgávur eru nokk forsømdar nakað orsakað av hesum.

Í mei mánaða gjørdist formaðurin álvarsliga sjúkur av hjartasjúku, so neyðugt varð við skurviðgerð (víðkan av kranspulsæðrum). Restina av árinum hevur arbeiðsinnsatsurin hjá formanninum verið nakað niðursettur av hesi orsøk.

Skrivstovan hevur verið opin hvønn yrkadag frá 08-14 og nevndarfundir hava verið hildnir regluliga.

## Fiskiskip

Síðani Reiðarafelagið fór í upploysn í 2009 eru sáttmálarnir gjørdir við hvønn einstakan skipabólk. Hesir eru síðani longdir á hvørjum árið við smærri broytingum. Nakað av óvissu hevur verið í onkrum skipabólki, um hvør hevur havt samráðingarheimildina og onkur hevur róð fram undir at felagsreglurnar í gamla sáttmálanum als ikki vóru galdandi longur. Hetta er tó ongantíð staðfest í nøkrum rættarúrskurði.

Tí settu manningarfeløgini sær fyri at fáa allar skipabólkar, at undirskriva felagsreglurnar og at hesar skuldu vera einsljóðandi fyri allar bólkar. Hetta var eitt stórt arbeiði, tí talan er um 8 sera ymiskar bólkar, sum hava sera ymiskar fortreytir at virka undir. Vit fóru fyrst í holt við Verksmiðuskip og Línuskip, tað gekk lutfalsliga lætt at fáa hesar sáttmálarna uppá pláss, her vóru

bert smávegis broytingar gjørdar í sáttmáltekstinum.

Tað gekk striltið at fáa Partrolarar og Lemmatrolarar til samráðingarborðið. Í roynd og veru varð neyðugt at boða Semingsstovninum frá, at vit fingu ongar samráðingar í lag. Um vit skuldu tvinga teir til samráðingarborðið við tiltøkum, so kundi hetta ikki gerast, uttan at Semingsstovnurin hevði fingið fráboðan fyrst. Umsíðir eydnaðist at fáa samráðingar í gongd. Vit løgdu stóran dent á, at limir okkara vóru sera misnøgdir yvir, at tað var sera ymiskt, hvussu nógv var trekt av pr litur fyri oljuna. Reiðararnir førdu fram, at hetta komst av at tað er sera ymiskt, sum oljan kostar, tey stóru reiðarínir fingu oljuna nógv bíligari enn tey smærru. Eisini var munur á prísinum, um ein kundi gjalda kontant. Sáttmálin loyvdi at oljuútreiðslur omanfyri 3,70 kr/litur vóru felagsútreiðsla (3,65 fyri lemmatrol).

Vit høvdu fleiri uppskot frammi, um hvussu hesin ójavni millum skipini kundi loysast. Millum annað eitt hámark fyri frádrátt pr litur og eitt mesta krónutal pr dag. Illa gekst at fáa eitt konstruktivt orðaskifti um hesi viðurskifti, tí fleiri reiðarar meintu, at talan varð um viðurskifti, sum bert viðvíkti teimum og oljuveitaranum. Eftir mangar fundir slitnaði við Partrolararnar og Semingsstovnurin varð biðin um at hjápa okkum víðari.

Eftir fleiri fundir, samdust partarnir um at frádrátturin fyri óvanligu høgu oljuútreiðslurnar skuldu broytast, soleiðis at bert skuldi verða loyvt at draga munin millum 4,65 kr/l og almenna listaprísin. Hetta kemur at føra við sær, at øll skipini brúka sama frádrátt pr litur. Markið á 4,65 kr/l hækkar til 4,70 kr/l 1. jan. 2014. Nakað seinni varð tilsvarandi sáttmáli gjørdur við Lemmatrolarar, ein minni hækking í býtisprosent og eykapørtum varð gjørd fyri lemmatrolarar við 5 monnum.

Eftir hetta varð sáttmálin við Rækjuskipini endurnýggjaður. Her var ongin broyting viðvíkjandi oljuúrreiðslum. Hesi skipini bunkra sera nógv hvørja ferð og fáa oljuna nógv bíligari enn heimaflotin. Nógv meira gjøgnumskygni hevur verið í oljuútreiðslunum hjá hesum skipabólki.

Nótaskipini ynsktu at fáa staðfest endaliga í sáttmálanum, at øll sløg av tilfeingisgjaldi skuldu vera loyvd felagsútreiðsla. Fiskimannafelagið hevði reist tvey mál í Gerðarættinum um hesi viðuskifti, tí valdu vit at stegða við sáttmálanum, inntil úrskurður varð sagdur. Málini eru umrødd seinni í hesi frágreiðing. FSN og MF gjørdu semju við Nótaskipini nakað áðrenn FF varð klárt at skriva undir, annars høvdu øll trý feløgini samrátt saman. Semjur vóru eisini gjørdar við Garnaskip, Ídnarskip og við tey skip/reiðarí sum hava sersáttmála m.a. Norðborg og Næraberg.

Samanumtikið kann tað sigast, at tað kravdi sera nógv tol og samráðingarsnildi til at fáa allar skipabólkar at undirskriva somu felagsreglur. Nú Reiðarafelagið er endurstovnað og hevur fingið nýggja leiðslu, er eitt gott grundarlag lagt fyri góðum og konstruktivum samtarvi við okkara mótpart, í komandi árum. Eitt tað fyrsta verður at fáa moderniserað sáttmálan og setanar– og lønarviðurskiftini hjá fiskiflotanum, so tey líkjast meiri teimum hjá sjómonnum og arbeiðsmarknaðinum annars. Her verður hugsað um uppsagnartíð, sjúkrahýru, eftirløn og trygg og jøvn lønarútgjalding.

Partarnir eru samdir um at seta ein arbeiðsbólk til at orða eitt upplegg til moderninsering av øllum sáttmálanum. Hetta skal gerast í friðartíð og úrslitið skal síðani verða partur av næstu sáttmálasamráðing.

## Farma– og frálandaskip

Tað gjørdist eisini bæði tungt og tógvi at endurnýggja sáttmálan fyri farma– og frálandskipini. Heili 13 samráðingarumfør skuldu til áðrenn partarnir vóru til reiðar at gera semju.

Tá samráðingarnar byrjaðu, førdu feløgini fram, at munurin millum sáttmálønina og veruliga lønarlagið er nú vorðið so stórt, at limir okkara venda sær í móti okkum. Teir føra fram, at hvat skulu vit brúka eitt fakfelag til, tá vit sjálvir mugu avtala eina hóskandi løn.

FSN hevði gjørt eina greining av lønarlagnum hjá øllum okkara 140 limum í FAS skipanini. Hon vísti, at í miðal fingu limir okkara 15% meir enn sáttmálalønina. Munurin var størst hjá teimum hægstu yvirmonnunum, serliga í frálandavinnuni og í farmasigling á norsku strondini. Lønarlagið hjá norskum og donskum reiðaríum, er so uppaftur 15% omanfyri føroysku individuellu lønaravtalurnar. Reiðararnir viðurkendu parvíst, at vit hava eitt problem á hesum øki, og vóru sinnaðir til at gera broytingar.

Feløgini hava tikið undir við, at tað skal bera til at avtala sær sjálvum eina hægri løn, men hetta má ikki forða fyri, at sáttmálalønin so eisini fylgir við uppeftir. Reiðarafelagið Fyri Farmaskip hevur hildið sera fast við, at lønarkarmurin fyri privata arbeiðsmarknaðin eisini skal galda fyri okkara sáttmála. Seinastu mongu árini hava flestu sáttmála broytingar havt til endamáls, at fjala ymiskar lønarhækkingar, við tí endamáli at tað skal sýnast, sum um at lønarkarmurin er galdandi.

Samráðingarnar hesuferð vóru onki undantak í so máta, munurin var bert, at nu fóru vit meira miðavíst til verka. Lønartalvan hevur verið deild upp í 11 bólkar eftir skipa/motor støðd. Nú er talvan broytt soleiðis, at 2 bólkar eru undir 3000 BT/KW og 2 omanfyri bólkurin ferðamannaskip omanfyri 21000 (Norrøna) er óbroyttur. Hægstu lønirnar í gomlu talvuni er nú galdandi fyri allan tann nýggja bólkin. Hetta merkir, at teir allarfelstu fáa

Gamla talvan: / Nýggja talvan:

| bólkur | BT/kW | bólkur | BT/kW |
|---|---|---|---|
| 1 | <450 | 1 | <749 |
| 2 | 450-749 | 2 | 750-2999 |
| 3 | 750-1499 | 3 | 3000-7999 |
| 4 | 1500-2999 | 4 | 8000 og yvir |
| 5 | 3000-4999 | | |
| 6 | 5000-5999 | 5 | Ferðamannaskip |
| 7 | 6000-7999 | | 21000 og yvir |
| 8 | 8000-9999 | | |
| 9 | 10000-11999 | | |
| 10 | 12000 og yvir | | |
| 11 | Ferðamannaskip | | |
| | 21000 og yvir | | |



eina fitta lønarhækking. Neyvar útrokningar eru gjørdar av hesum og limir okkara kunnu altíð fáa hesar.

Skipanin við einari serstakari viðbót fyri frálandavinnuna, er ikki serliga gjøgnumskygd, tí hava vit nú gjørt eina serstaka lønartalvu fyri frálandaskipini. Bygnaðurin í talvuni er tann sami, sum nevnt frammanundan. Áðrenn lønir og viðbótin vóru fluttar í nýggju talvuna, varð viðbótin hjá skiparum og maskinstjórum umroknað til at verða ein prosent partur av lønini. Hetta merkir, at teir fingu eina eyka lønarhækking, umframt aðrar hækkingar.

FSN hevur nú einsljóðandi ásetingar um uppsøgn, sum Maskinmeistarafelagið, t.v.s., at eyka uppsagnartíð fyri drúgva tænastu sambært sjómanslógini, nú liggur í tí vanligu uppsagnartíðini, í mesta lagi 6 mánaðir. Navigatørar skulu nú sigast upp til tann fyrsta í einum mánaði. Hetta hevur verið galdandi fyri MF í mong ár. Nú er ásett, at rætturin til heimferð er til bústaðin hjá sjómanninum, fyrr stóð at ein hevið rætt til ferð til Føroyar. Hetta hevur týdning fyri teir, sum búgva uttanlanda, men sigla við føroyskum skipi.

Ein onnur týðandi broyting er, at nú hava teir, sum hava egna lønaravtalu, rætt til at fáa hesa dagførda, tá sáttmálin er broyttur. Hetta skal gerast innan 6 mánaðir og ein hevur rætt at ráðføra seg við fakfelagið, áðrenn skrivað verður undir avtaluna. Fakfelagið hevur tagnaskyldu viðvíkjandi teimum upplýsningum, sum vit fáa í hesar avtalur. Felagið kann tó vegleiða tann einstaka limin, um hvat eitt hóskandi lønarlag er fyri viðkomandi starv.

Tað eru fleiri mátar at gera egna lønaravtalu. Ein máti er at avtala eina fasta mánaðarløn, annar máti er sáttmálalønina, pluss eina ávísa upphædd. Eisini ber til at avtala, at ein fær løn úr einum hægri bólki, enn tann sum skipið hoyrir til. Onnur viðurskifti kunnu eisini vera partur av avtaluni, men hon má ikki stríða í móti meginreglunum í kollektiva sáttmálanum.

Hóast nakrar ábøtur nú eru komnar í sáttmálan, so manglar nógv í enn. Málið hjá okkum er, at vit skulu kunna kappast við okkara grannalond, bæði í setanatreytum og lønarlagi. Tað tykjast sum um at føroyski arbeiðsmarknaðurin nú er vaknaður við kaldan dreym. Tí øll tann vælskikkaða arbeiðsmegin heldur vil starvast í útlondum. Eitt sera avgerandi mál, sum ikki er partur av sáttmálanum, er at FAS skattaskipanin er munandi verri fyri sjómannin enn skattaskipanin hjá teimum, sum sigla uttanlands.

## Strandferðslan

Nýggjar reglur um hvíld hjá sjófólki eru komnar í gildi í ár. Hesar hava sum meginreglu, at sjómenn skulu hava 11 tíma hvíld um døgnið. Sáttmálin fyri strandferðsluna er grundaður á, at arbeitt verður 14 tímar um dagin áðruhvørja viku. Tað ber illa til at arbeiða 14 tímar og síðan hvíla í 11 tímar í sama døgni. Tí hava vit nú í fleiri ár kravt, at arbeiðstíðin skal samsvara við nýggju ásetingarnar, sum hava verið ávegis í nøkur ár. Vit høvdu í 2011 fingið eina skrivliga tilsøgn, um at vit skuldu taka hetta mál upp, tá nýggju reglarnar vóru partur av føroyskari lóggávu.

Tá samráðingarnar byrjaðu, gjørdu vit motparti okkara greitt, at vit ikki gjørdu nakran sáttmála uttan at hesi viðurskifti komu uppá pláss. Tískil slitnaði millum partarnar eftir bert tveir fundir. Semingsmenninir vóru boðsendir og nógvir fundir vóru hildnir, har vit royndu sum frægast at greiða frá, hvat ósemjan snúði seg um.

Tá samráðingarnar við Maskinmeistarafelagið eisni slitnaðu, valdu semingsmenninir at teingja semingina saman fyri bæði feløgini. Hetta var bert galdandi fyri sáttmálan fyri SSL.

**Feløgini hildu seg hava eina sera góða sak hesuferð. Kravið um broytta arbeiðstíð varð grundað á hesi trý viðurskifti:**

*Nýggja lógin broytir hvat arbeistíðin í mesta lagi kann verða*

*Vit høvdu eina skrivliga tilsøgn fá mótpartinum*

*Játtanin á Fíggjarlógini til SSL, er hækkað orsakað av nýggju hvíldarreglunum.*

Nýggj lóg um Semingsstovn varð samtykt í vár. Hon áleggur pørtunum á arbeiðsmarknaðinum at avtala sínamillum reglur í áhugatrætu (konflikt). Hesar skulu í minsta lagi innihalda reglur um fráboðanarform og fráboðanarfreist fyri arbeiðssteðgi. Hetta mál gjørdist eisin partur av okkara sáttmálasamráðingum við Fíggjarmálráðið um Strandferðsluna. Mótpartur okkara vildi ganga okkara ynski á møti um lægri arbeiðstíð, um vit vildu frásiga okkum rættin at fara í verkfall.

Feløgini boðaðu greitt frá, at so kom kostnaðurin at verða tann sami, sum tá limir okkkara hjá Fiskiveiðieftirlitinum gjørdist tænastumenn. Eitt annað modell sum var umrøtt, er skipanin í sáttmálanum fyri frálandaskip, har partarnir hava avtalað eina 5 ára friðarskyldu.

Semingsmenninir vildu ikki hava hesi viðurskifti við í einum semingsuppskoti, uttan so at báðir partar ynsktu hetta. Teir hildu, at teirra uppgáva er ikki at uppfinna nýggar spælireglur á arbeiðsmarknaðinum. Feløgini duga væl at síggja, at tíðin er helst farin frá teimum døgum, har okkara samferðsla á sjónum kann leggjast lamin frá degi til dags. Men samstundis vóru vit ikki sinnaðir at lata verkfallsrættin fyri lægri arbeiðstíð. Vit hildu, at broytingin í arbeiðstíðini áttu vit óansæð.

Undan semingsroyndini fingu vit greið signal frá politisku skipanini, at eitt møguligt verkfall fór at verða steðgað við lóg beinanvegin. Sostatt stóðu vit í einari sera torførarari støðu, sum væl kundi endað við, at vit fóru at blíva bukaðir uppá pláss, uttan at hava fingið nakað sum helst av ábótum til limir okkara.

Tískil valdu vit at spæla út við, at vit vildu loyva einari avmarkari sigling í eitt stutt tíðarskeið, meðan arbeiðssteðgur er. Saman við einum 3 ára sáttmálaskeiði, til at innføra nýggju lækkaðu arbeiðstíðina, gjørdist hetta bulurin í semingsuppskotinum. Feløgin forvænta nú, at allir partar fara at virða at nú hava vit gjørt reglar um, hvussu farast skal fram undir verkfalli og at alt tos um at leggja uppí í øðum verkum má tagna.

Samanumtikið kann sigast, at vit fingu tað sum vit fóru eftir. Vit halda, at nýggja skipan til at regulera komandi arbeiðssteðgir er ikki til ógagns fyri limir okkara.

## Tilfeingisgjald

Seinastu tvey árini hevur landið kravt tilfeingis gjald av øktu silda- og makrelkvotunum. Fíggjarlógin fyri 2014 hevur inntøkuført meir enn 100 mió. í tilfeingisgjaldi fyri komandi ár. Ein stórur spurningur hevur verið um tilfeingisgjald er ein felagsútreiðsla, tá manningin skal avroknast. Reiðarar hava víst á, at sambært § 17 á sáttmálanum, so eru øll almenn avgjøld loyvdur frádráttur. Fiskimannafelagið hevur ført eitt gerðarættarmál um hendan spurning. Heilt ítøkjuliga var málið um hvørt uppboðssølugjaldið fyri makrelkvotu í 2011 var loyvt sum felagsútreiðsla. Gerðarrættur gav ikki Fiskimannafelagnum viðhald, hann grundaði niðurstøðunan útifrá vitnisfrágreiðing frá teimum, sum upprunaliga orðaðu § 17 í felagsrelunum. Teir søgdu, at ongin ivi kundi verða um, at hetta gjaldið var loyvd felagsútreiðsla. Fiskimannafelagið hevur eisini biðið um sáttmálatulking av um hvørt kilogjaldið er loyvd felagsútreiðsla, men úrskurðurin í fyrra málinum er so greiður, so tað er sera ivingarsamt, um úrskurðurin verður nakað øðrvísi hesuferð. Hóast FSN ikki hevur verið partur í hesum málum, so fáa niðurstøðurnar ávirkan á okkum, tí felagsreglurnar eru einsljóðandi fyri øll manningarfeløgini.

Serliga avgjaldið á 2 kr/kg á avreiðingar til útlendsk móttøkuskip hevur gjørt, at tey skip sum ikki kunnu føra fiskin til lands, sjálvi fáa nærum einki burtur úr silda– og makrelveiðuni. Tað er ein sannroynd, at hesi móttøku skip gera sær dælt av støðuni og trýsta prísin so nógv niður, sum møguligt. Tað ger støðuna ikki betur, at veiða er skipað sum felagskvota við olympiskum fiskaríið. Komandi ár mugu annaðhvørt eginkvotur, ella ein



Fundarluttakarar á aðalfundinum.

minstiprísur ásetast. Tað kann ikki halda áfram, at landskassin skúmar róman, samstundis sum skipini mugu forera fiskin burtur.

## Silda– og Makrelósemjan

Eingin semja er enn gjørd millum strandarlondini um makrel og sildafiskiskapin í norðurhøvum. Tað kan tykjast, sum ES hevur flutt seg nakað, men samstundis eru tað teir, sum hava sett tey strangastu revsitiltøkini ímóti okkum. FSN tekur fult undir við, at vit verja rættin at fiska okkara rímuliga part av tí fiski, sum er í okkara sjóøki.

Tó vilja vit ávara ímóti, at ósemjan verður upptrappað meir enn neyðugt. Tað er umráðandi, at onnur viðurskifti ikki gerast partur av ósemjuni. ES og Noreg hava nógv fleiri møguleikar at revsa okkum, enn vit hava at revsa teir. Tað einasta vit kunnu gera, er at fiska uppaftur meira, um vit halda, at revsitiltøkini ímóti okkum eru órímilig.

## Ein vistfrøðilig vanlukka

Føroyar mugu framleggja prógv fyri tí vistfrøðiligu vanlukku, sum hevur rakt okkara landgrunn, orsakað av innrásini av makreli og sild. Havstovan hevur higartil ikki tikið hendan trupulleika í nóg stórum álvara. Okkara vísindamenn koma við síni vanligu frágreiðing, um at minkingin í botnfiskaveiðuni kemst bert av ovurfisking og ov stórum fiskidagatalið. Tað kann tykjast, sum um at okkara fiskifrøðingar ikki vilja síggja tað, sum er opinbert fyri øllum. Greiðasta dømi er Føroya Banki, har eru botnfiskastovnarnir í stórari minking, sjálvt um ongin veiða hevur verið har í fleiri ár.

FSN vil ávara ímóti, at vit í øðum verkum broyta fiskidagatal og gera hópin at nýggjum reguleringum, orsakað av hesum sera óvanligu umstøðum.

## Lívstrygging

Tað gongur sera striltið hjá fakfeløgunum at keypa Lívstrygging frá Landsstýrinum. Tryggingareftirlitið vildi ikki uttan víðari góðtaka tann leist, sum keypið eftir ætlan skuldi gerast. Landskassaveðhaldið fyri tær gomlu tryggingarnar og fíggingarleisturin vóru ikki góðtiknar í fyrsta umfari. Nú verður so roynt aftur við øðrvísi fíggingarleisti við størri eginfígging. Tilgongdin hevur verið drúgv og kostnaðarmikil. Um ein endalig loysn ikki kemur á hesum máli nakað skjótt, má FSN umhugsa, um vit framhaldandi skulu vera við til at keypa Lívstrygging. FSN hevur givið tilsøgn um, at vit vilja seta partapening í felagið, sum skal keypa. Eisini vilja vit veita felagnum eitt ábygdarlán á 1 mió. Kr.

## Mugu vita meiri um hví Gullberg sakk

Tað vóru mong, sum gjørdur ikki sørt skelkaði, tá tað frættist at trolarin Gullberg var sokkin. Tíbetur var øll manningin bjarga, men missurin at skipinum er svárur bæði fyri manning og reiðarí.

Gullberg var eitt hamuliga nýtt skip, sum var í góðum standi og væl viðlíkahildið. Tí eru tað mong, sum undrast yvir hvussu hetta kundi henda. Fyri okkum sjómenn er enn meiri undrunarsamt, at skipið sakk eftir so stuttari tíð. Eisini at ongin ábending um nakran leka var sæddur framanundan.

Sjófrágreiðingin gav ikki nakað greitt svar uppá hendan spurning. Sjógvurin fyltist so skjótt og brádliga í maskinrúminum, at ongin vón var um at halda skipinum lens. Hevði manningin ikki borið so skjótt í at fara av skipinum kundi ein stór vanlukka staðist av hesum.

FSN hevur á nenvdarfundi samtykt, at vit vilja virka fyri at meira fæst at vit um hetta álvarsmál. Vit hava staðfest, at mong eru sum gita um ymiskar orsakir til henda tilburð. Tað er á ongan hátt nøktandi fyri okkara fiski og sjóvinnutjóð, at hetta ávarsmál ikki er lýst til fulnar.

Vit hava tikið málið upp við stjóran á Skipaeftirlitinum Hans Jóhannes á Brúgv, hann upplýsti okkum at Skipaeftirlitið longu nú ger ávísar kanningar av hesum málið. Tað sýnist ikki at vera samsvar í millum, hvussu skjótt skipið fyltitst og hvussu nógv kann renna ígjøgnum tey ymsku sjósambondini . Hesi eru millum annað kølivatnsinntak og lensiventilar.

Vit mæltu til at fáa útgreina hvørjar umvælingar er gjørdar á sjósambondini líka síðan skipð varð bygt, og fáa samanhildið hesar upplýsningar við systirskipið Sjagaklett.

FSN fer at fygja við hesum málið

## Inntøkutrygdin munandi betra

Í hesum árinum er minstalønin hækkað munandi. Hon er nú 900 kr um dagin, pluss frítíðarløn. Hetta er til stórt gagn fyri tann veikasta partin av okkara fiskiskipaflota. Vinnan sjálv hevur nú í trý ár, varað av inntøkutrygdini. Trygdargrunnur Fiskivinnunar krevur 1% av øllum avreiðingum inn í trygdargjaldi. Grunnurin skal útgjalda minstuløn til skipsfiskimenn og minstaforvinning til útróðrarmenn. Tað eru umboð úr vinnuni, sum stjórna grunninum, eginognin er nú komin uppá 80 mió. Orsøkin til góðu gongdina hjá Trygdargrunninum, eru stóru avreiðingarnar av uppsjóðarfiski, eisini er talið av fiski– og útróðrarmonnum minkað munandi. Seinastu 8 árini er talið av løntakarum innan fiskiskap lækkkað frá 2500 niður á 1600 ella við 36%. Hetta ger, at tørvurin á inntøkutrygd er alsamt minkandi. Peningurin í Trydgdargrunninum eigur at koma fiskivinnuni tilgóðar á annan hátt, enn bert sum minstuløn. Til hetta krevst lógarbroyting og hugsast kann, at einaferð í framtíðini kann grunnurin eisini veita inntøkutapstrygging, eyka sjúkrapening, stuðul til skeið– og eftirútbúgving og onnur viðkomandi endamál.

## Alsamt fleiri við útlendskum skipum

Gongdin á føroyska arbeiðsmarknaðinum er ræðandi. 12 % av øllum lønarinntøkum verða nú forvunnar frá útlendskum arbeiðsgevarum. Onki fordømi er úr vesturheiminum uppá nakað land, sum bert minnir um hetta. Ì mong ár hava tað serliga verið sjómenn, sum hava starvast uttanlands, men nú eru tað handverkarar, sum í stórum talið leita sær til Noregs at arbeiða. Góðu lønirnar avlaga lønar– og kostnarstøðið her heima. Føroyski arbeiðsmarknaðurin kann hvørki fylgja við í lønarlagi, ella lønarhækking. So munurin gerst størri og størri, sum tíðin gongur. Annar enn størri trupulleiki er, at okkara skatta skipan favoriserar tey, sum forvinna sína inntøku uttanlands frammum



tey, sum starvast hjá føroyskum arbeiðsgevara. Hetta kann sjávsagt ikki halda áfram. Føroyski arbeiðsmarknaðurin má gerast kappingarførur, um arbeiðsmegina í egnum landi.

## Kanning saman við Antares

Í 2008 gjørdu FSN og Maskinmeistarafelagið eina kannig av, hvussu stórar inntøkur sjómenn við útlendskum skipum forvunnu til føroyska samfelagið og hvussu stórt árin hesar høvdu á búskapin. Tað var Granskingardepilin fyri økismenning, sum stóð fyri kanningini. Dennis Holm og Magni Laksáfoss, granskarar, skivaðu frágreiðingina. Nú hevur áhugafelagið hjá útisiglarum „Antares," biðið okkum um at tikið kanningina uppaftur við dagførdum tølum. Hesuferð skal enn størri dentur leggjast á, at fáa nágreinað týdningin, sum stóra uttanlands inntøkan hevur á føroyska pengingarenslið og okkara vælferð sum heild. Maskinmeistarafelagið hevið ikki áhuga í at luttaka í kanningini hesuferð. FSN heldur, tað hevur stóran týdning, at neyvar og álitandi upplýslingar liggja til grund fyri framhaldandi orðaskifti um hetta mál

## FAS sum hentleikaflagg

Føroyska flaggið er framvegis á listanum yvir hentleikafløgg hjá ITF (International Transportworkers Federation). Vit hava fingið at vita, so leingi lóggávan í Føroyum um samráðingar rættin íkki uppfyllir teirra krøv, so vera vit verandi á listanum. Somuleiðis má massiva innflaggingin úr okkara grannalondum minka ella stegða. Føroysk reiðarí við føroyskari manning, eiga ikki at verða rakt av, at vit standa á hesum lista. Men hóast hetta, hevur hetta negativt árin á vaksandi føroysku frálandavinnuna, tí er lógaruppskot nú lagt fram, sum loyvir føroyskum fakfeløgum at gera lønar– og setanarsáttmála fyri útlendska manning við FAS skipum. Manningarfeløgini arbeiða áhaldandi fyri, at vit sleppa av hesum lista aftur. Tað kann koma at hava týdning, at FAS skip ikki verða afturhildin í Port State Control fyri brot á MLC sáttmálan. Hesin áltjóða sáttmáli kom í gildi 20 august í ár, og hann skal tryggja, at allir heimsins sjómenn hava virðilig sosial kor at virka undir.

## Fremmandir sjómenn fáa eisini hjálp

Farmaskipið Saga, sum eru undir FAS, var lagt í Søldarfirði tíðliga í vár. Tað er eitt íslendskt reiðarí, sum átti skipið. Føroysku manningarfeløgini fingu áheitan frá ITF í London um at hjálpa manningini til at fáa ta hýru, sum teir áttu tilgóðar, so teir sluppu av skipinum. Manningin var úr baltalondum. Eisini høvdu nakrir íslendingar verið við stutt framanundan við hýru tilgóðar. Vit tóku síðani arrest í skipinum fyri kravinum og løgdu hýruna út til manningina. Skipið varð selt á tvingsilssølu í august mánaða, og vit hava fingið peningin aftur. Hetta er fyrstu ferð, at vit hava gjørt sjópantikrav galdandi fyri útlendskar sjómenn við føroyskum skipi. Tað kann fáa stóran týdning í okkara samskifti við ITF, at vit vísa í verki, at vit vilja hjálpa fremmandum sjómonnum, sum hava trupulleikar á FAS skipum.

## Limaskarin minkar

Talið av virknum limum í FSN hevur seinastu mongu árini verið rímuliga stabilt. Seinastu tvey árini hava vit tó sæð eina markanta minking. Virknir limir eru teir, sum starvast á okkara sáttmálaøki. Gongdin hevur verið, at tað hevur minkað innan fiskiskap, men ein tilsvarandi øking hevur verið innan farma– og frálandavinnu. Hetta er tó broytt seinstu tvey árini. Framgongdin innna farma– og frálandavinnu er støðgað upp. Hetta er hent hóast nógv nýggj skip eru komin uppí FAS og hesi hava føroyskar navigatørar umborð. Vit síggja tó, at tað er hjá ávísum reiðaríum, at áhugin er fyri limaskapi er víkjandi. FSN hevur roynt at spyrja seg fyri, hvør orsøkin kann vera, Tað eru ymiskar afturmeldingar, vit fáa. Hesar eru millum annað, at teir vilja ikki verða í fakfelag av hugsjónarligum grundum, at tað er ov dýrt at vera limur og at okkara sáttmáli er ov vánaligur í mun til tað, sum ber til at fáa við egnari avtalu. Eisini siga summir, at teir sigla bert við føroyskum skipi, inntil teir fáa starv hjá norðmonnum. Tað er ikki bert hjá okkum, at hendan ódámliga gongd vindur uppá seg. Vit fáa tilsvarandi tíðindi frá navigatørfeløgunum í okkara grannalondum. Tað er serliga í Danmark, at áhugin fyri limaskapi í fakfelagi er minkandi.

### Yvirlit yvir limatal

| Ár | Fiskisk. | Farma. Frálandav. | Annað | Tils. Akt. | Hvílandi | Limir íalt |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 2009 | 358 | 136 | 85 | 579 | 620 | 1199 |
| 2011 | 367 | 155 | 81 | 603 | 521 | 1124 |
| 2013 | 313 | 117 | 79 | 509 | 538 | 1047 |

## Mið og Magn

Limablað okkara er nú komið út í meir enn fýra ár og afturmeldingarnar hava verið positivar. Tað er arbeiðskrevjandi og kostnarmikið at geva blað út. Eisini er tað torført at kappast við elektrónisku miðlarnar, sum eru munandi kvikari við nýggjastu tíðindum. Leiðslan í Mið og Magn hevur umhugsað møguleikan fyri, at vit leggja um til ein netbornan miðil. Men tað vísir seg, at allir hesir miðlarnir bert kappast um at vera fyrstir við tíðindastubbum og hugsa als ikki um at gera eitt dygdargott redaktionelt arbeiði. Tí hava vit valt at halda fram við pappírsútgávuni eina tíð enn.



Frá vinstru Leif Joensen, Regin Nónstein, Gulak Gulaksen, Ellintur M. Abrahamsen og Leivur Christiansen.

## FSN húsið

Skrivstovubygningur okkara er í ringum standi. Soppur er staðfestur, men tó ikki í heilsuskaðiligari konsentratión. Ein størri og umfatandi umvæling er neyðug. Byggisakkøn mæla frá at gera smærri ábøtur, uttan at hesar eru partur av einari samlaðari umvæligarætlan. Vit hava í longri tíð hugt eftir øðrum hóskandi hølum. FSN hevur lagt umsókn inn til at fáa innivist í nýggja Sjóvinnuhúsinum hjá Tórshavnar Komunu. Hetta er gamla Saltsølan, sum nú skal brúkast til stovnar og fyritøkur, sum hava eitthvørt við sjógvin at gera. Vit hava ikki fingið endaligt svar enn, men hetta kundi verið ein spennandi loysn á okkara hølistørvi. Ì Sjóvinnuhúsinum skulu vera nógvir ymiskir felagsfasilitetir, sum leigararnir skulu kunna brúka. Longu í 2014 flyta fyrstu fyritøkurnar inn í nýggju stásiligu hølini á Vestaru Vág.

## Navigatørkongressin á Viðareiði

Vit vóru vertir fyri Norðurlendsku Navigatørkongressini í juni mánaða. Ráðstevnan varð hildin á Viðareiði í fagrasta summarveðrið. Gestirnir fingu nakrar framúr góðar dagar her hjá okkum og fleiri nýttu eisini høvi at stegða nakrar dagar eyka, fyri at síggja okkara land enn betur. Navigatørkongressin hevur meir enn 100 ár á baki. Her hittast norðurlendsku navigatørfeløgini til at umrøða mál av felags áhuga. Tveir fundir eru á hvørjum ári. Annar umrøður fakfelagsmál og hin er eitt sjó– og trygdarseminar saman við sjóferðslumyndugleikunum úr øllum Norðanlondunum. Hetta samstarvið hevur stóran týdning fyri menningina av FSN og eisini hevur tað stóran týdning at hava góð sambond við okkara grannalond, nú so mangir føroyskir sjómenn starvast har. Tað kemur meir enn so fyri, at føroyingar fáa ymiskar trupulleikar við sín útlendska arbeiðsgevara og tá hevur tað mangan verið hent, at fáa hjálpt teimum ígjøgnum okkara norðulendsku vinir.

## Stuðulsgrunnurin hjá FSN

Fyri hálvumøðrum árið síðan avgjørdi nevndin í FSN at stovna ein stuðulsgrunn. Felagið hevur í mong á stuðlað ymiskum vælgerandi endamálum og tiltøkum. Vit fáa hópin av umsóknum um peningaligan stuðul. Vit hava higartil avmarkað okkum til at stuðla tí, sum hevur eitthvørt við okkara virkisøki at gera. Eisini hava vit stuðlað tiltøkum av almannagagnligum slagi. Nú hava vit so av praktiskum áðum valt at leggja hendan partin av okkara virksemi í ein grunn. FSN setti kr 50.000 sum stovnsfæ í grunnin. Eisini er samtykt, at rentan av frítíðarlønini skal í grunnin. Henda hevur seinastu árini verið uml kr 100.000. Hetta tíðaskeiðið eru goldnar góðar kr 60.000 út úr grunninum. Vit hava sum meginreglu, at vit erpa okkum ikki av hvørjum vit stuðla.

## At enda

Í komandi tíðum er tað sera umráðandi, at vit leggja okkum eftir, at vit framhaldandi eru ein viðkomandi felagsskapur fyri allar navigatørar. Tað kann gerast neyðugt at endurskoða, hvussu vit gera okkara arbeiði og ikki minst hvørjar okkara uppgávur eru. Felagið er væl fyri fíggjarliga og vit eiga at umhugsa, hvussu vit kunnu broyta og víðka okkara virksemi, til at røkka hesum endamáli.

At enda skal eg vegna nevnd og starvsfólk, takka øllum limum okkara fyri gott samanhald og góðan stuðul í nú skjótt farna árinum og ynskja øllum eitt Gott Nýggjár og Harrans signing í komandi tíðum.

# Møði kann elva til álvarsamar trupulleikar á einum arbeiðsplássi

Vit vita, at møði fær okkum at kenna okkum troytt og lin. Hetta kann vera eitt úrslit av longum mentalum ella kropsligum arbeiði. Møði kemst m.a. av svøvnloysi, longri tíðarskeið við ótta, ella at vera í einum ágangandi og hørðum umhvørvi.



*Annbjørg á Høvdanum: MSc í arbeiðssálarfrøði, ið er líkastillaður við danska Cand. Psych.*
*Annbjørg á Høvdanum hevur ein serligan áhuga fyri møði, og hvussu møði ávirkar heilsuna hjá tí einstaka og trygdina á arbeiðsplássinum.*

*Í hesum sambandi er hon partur av trimum minni norðurlendskum arbeiðstoymum.*
*Eitt av toymunum hyggur aftureftir viðvíkjandi fatalum vanlukkum á sjónum, fyri at lýsa týttleikan, høvuðsgrundirnar fyri vanlukkum, og fyri at hygga at hvørja ávirkan trygdarátøk hava havt. M.a. um tey síggjast aftur í tølunum yvir tey síðstu árini?*

*Næsta granskingarverkætlanum fæst við at gera eitt felags skrásetingarskema fyri øll norðurlond til vanlukkur á sjónum, har málsetingurin er, at skaðafráboðanarskipanin blívir effektivari og at skapa betri forútsetning fyri at gera munagóð fyribyrgjandi tiltøk.*

*Triðja toymi hyggur at arbeiðstíðum, møði og skaðum undir fiskarí.*

*Útyvir omanfyristandandi arbeiðir Annbjørg eisini part tíð sum sálarfrøðingur á Blákrossheiminum.*

Kanningar hava prógvað, at møði hevur stóra og álvarsama ávirkan á tað at vera árvakin. Hetta uppliva vit, tá ið vit arbeiða – í longri tíð – við nógvari konsentratión og uppmerksemi, og tá stór krøv vera sett til okkum.

Tað kann vera talan um ein maskinmeistara í einum eftirlitsrúmi har hann skal fylgja við mongum uppgávum samstundis í langa tíð.

Tað kann eisini vera talan um arbeiði har fólk standa við eitt „rulluband" á landi, ella umborð á skipi í ov nógvar tímar. Eitt annað dømi kann vera arbeiðið „á brúnni", har beinast skal fyri vandamálum í fiskiskapi og í sigling.

## Ymiskar upplivingar og sinnisstøður

Møði fevnir um nógvar ymiskar upplivingar og sinnisstøður t.d. at kenna seg útlúgvaðan, hava niðursetta orku og lívsmegi, mishug og tørv á svøvni.

At „kobla frá" av berari møði er tann natúrliga reaktiónin hjá einum likami ella einum likamsluti, sum eftir áhaldandi trýst hevur nátt markið fyri tí ein orkar.

## Orsøkin til vanlukkur

Orsøkin til, at vanlukkur henda kann vera ein samantvinning av tekniskum og menniskjaligum faktorum. Har kann møði frá longum arbeiðsdøgum, saman við ov lítlum ella ov vánaligum svøvni, vera ein sera stórur og relevantur faktorur.

Tá vanlukkur henda er orsøkin ofta, at fleiri „faktorar" eru til staðar samstundis, t.d. um vit taka skiparan ella stýrimannin á brúnni, so er vandin størri, tá fleiri faktorar spæla saman: t.d. møði, myrkur, hiti ella óljóð, sum órógva javnt og samt.

Tað er størri møguleiki fyri, at fólk ikki fata og ikki handla – tá handlast skal – tá allir hesir faktorar eru til staðar, enn tá bert ein er til staðar.

Tað er fleiri ferðir blivið prógvað, at møði er ein av høvuðsfaktorunum, sum føra til menniskjalig mistøk, og tað verður mett, at minst 20% av øllum vanlukkum skyldast møði, og at møði er stórsti – einsamalli faktorur – sum elvir til vanlukkur.

## Stórar kendar vanlukkur

Stórar vanlukkur, har møði var partur av orsøkini, eru m.a. Chernobyl kjarnorku vanlukkan, sum hendi kl. 01.20 og Three-mile Island kjarnorku vanlukkan í Pennsylvania í 1979, sum hendi kl .04.00.

Hesar báðar vanlukkurnar vóru úrslit av menniskjaligum feilum. Arbeiðsfólkið reageraðið hvørki uppá óvæntaðar ella óvanligar feilir í eftirlitsrúminum. Hetta hóast tað hevði lati seg gjørt at fingið tamarhald á støðuni.

Hesar vanlukkurnar hava verðið við til at varpa ljós á tað neiligu ávirkanina, sum møði hevur á mentalu funktiónirnar hjá menniskjunum, serliga hvat viðvíkur heilsu og trygd.

Møði hevur avleiðingar fyri okkara avrik

Tá ein persónur er ávirkaður av møði lækkar arbeiðsavrikið munandi. Og tað ávirkar allar menniskjaligar førleikar: kropsligar, kensluligar og mentaltar T.d. ávirkar møði okkara førleika at taka avgerðir, okkara fatanarevni versna, samskipan ímillum eyga og hond verður vánalig. Vit brúka longri tíð uppá at geva eitt svar, ella skipa setningarnar vit skulu siga og nógv annað. Í tí dagliga kenna vit kanska hetta aftur, at tá vit hava vakt leingi, so er ringt at konsentrera seg og vit gloyma orðini, tá vit skulu tosa.

Tá menniskjur eru troytt gera tey fleiri mistøk, sum hava við uppmerksemi at gera. Og eisini í sambandi við uppgávur, sum seta krøv til minnið. Tað er ikki óvanligt fyri troytt fólk at leypa stig um í eini fastlagdari mannagongd. Skráseting av øllum upplýsingum verða verri, og upplýsingarnir verða eisini oftari misfata.

> Fólk, ið eru troytt hava eisini ofta lyndi til tilvitað at velja mannagongdir, sum eru minni orkukrevjandi fyri tey, men sum hava við sær ein størri vanda fyri, at ein vanlukka kann henda.

Orsøkir sum økja um møði eru: *strongd, ørkymlan, svøvntrupulleikar, manglandi kropsliga íðkan, skeivur kostur og ov lítil svøvnur.*

Meðan møði kann ávirka fólk ymiskt, og tað kann vera ymiskt, hvussu útlúgvaður man gerst, so er gransking komin fram til, at tað eru hesir faktorar, sum gera seg galdandi:

- Larmur (hoyriveik fólk verða meira plágað av troyttheit
- og stress)
- Hiti
- Vit hava lægst orku frá kl. 3 til 5 og frá kl. 15 til 17.
- Svøvntrupulleikar
- Umhvørvi
- Kostur
- Likamlig venjing
- Heilivágur
- Heilsa
- Aldur

### Mental møði:

- Lin og sein orsaka av ov
- lítlum svøvni
- Trupulleikar við at hugsavna seg
- Uppmerksemistrupulleikar
- Niðursett evni at hugsa kreativt
- Niðursett evni at hugsa logist

### Kropslig møði:

- Minkan av kropsligum førleikum
- Vánalig kropslig kensla
- Eymir vøddar
- Manglandi orka

## Stórar avleiðingar fyri tann einstaka

Tá ið tað í longri tíð eru ov fá at lyfta byrðuna á einum arbeiðsplássi, ella arbeiðsbyrðan hjá einstøkum er ov stór, at ein altíð er undir trýsti, og ikki fær neyðugu hvíluna til at byggja seg uppaftur so økist vandin fyri sálarligum líðingum og vanlukkum.

Her verður serliga hugsa um strongd, tunglyndi og ótta, og talið av sjúkradøgum økist munandi. Í eini kanning á einum sjúkrahúsi har tað – í meira enn eitt ½ ár – vóru 10% fleiri sjúklingar á deildini enn tað, ið deildin var normerað til – hevði tað við sær – stóra øking (70%) av nýtslu av „eydnubollum" hjá starvsfólkunum.

Kanningar innar flogferðslu vísa, at tá arbeitt verður í 10-12 tímar, tá veksur vandin fyri vanlukku við 1.7 hjá flogskiparum, og eftir 13 tímum

við 4-5 ferðum. So her er talan um „eksponentiellan vøkstur”.

Kanningar har møði er samanborin við trupulleikar í sambandi rúsdrekkainnihald í blóði hjá fólki vísa, at tá fólk hava verið vakin í 17 tímar er virkisførleikin niðursettur svarandi til 0.5 promillu og eftir 24 tíma vøku var mentali virkisførleikin niðursettur svarandi við 1.0 promillu.

> Hetta sigur okkum, at vit á ein hátt kunnu samanbera trupulleikar, ið standast av møði við trupulleikar, ið standast av alkoholi.
>
> Tá ið vit eru darvaði av møði eru okkara fatanarevni og virkisførleiki avmarkaður, og vit duga illa at meta um støðuna vit eru í.

Við hesi vitan sigur tað seg sjálvt, at øll arbeiðspláss altíð eiga at tryggja sær, at starvsfólkið fær tann svøvn, sum er neyðugur, tá vit hugsa um arbeiðsførleika og heilsu. Hetta er galdandi á landi eins og á sjógvi.

## Hvussu kunnu vit so verja okkum? Hvat er ein ov stór arbeiðsbyrða?

Arbeiðsbyrðan er mett at vera ov tung, um ein noyðist at arbeiða langar dagar, ella tá arbeiðið er kropsliga krevjandi ella mentalt tyngjandi.

Tá vit síggja ein vøkstur í fylgjandi punktum, so er tað vanliga eitt tekin um, at byrðan er ov stór. T.d: Fleiri sjúkradagar, gera fleiri feilir og vanlukkur, vøkstur í brúki av stimbrandi evnum fyri at klára dagin, vit leggja merki til broytingar í svøvnmynstrinum, ella sova illa, vit broyta etingarvanar og fáa lættari bruna (infektión). Út yvir hesi, so fáa fólk ið lýða av kroniskari møði, eisini oftari hjartasjúkur, andatrupuleikar og sodningartrupuleikar.

## Tá arbeiðsdagurin fer upp um 8 tímar, minkar arbeiðsførleikin

Í eini kanning, sum samanbar 39 kanningar, sum allar hugdu at longd av arbeiðsdegnum vísti tað seg, at 26 av luttakarunum mettu, at teirra arbeiðsførleiki minkaði, tá arbeiðsdagurin var meira enn 8 tímar, 10 merktu ongan mun, og 3 dámdu betur at arbeiða langar dagar (Dahlgren et. Al, 2003 í Knaut, 2007).

### Tey, sum eru í vandabólki, tá talan er um møði

- Fólk, sum fáa ov lítlan svøvn
- Fólk, sum arbeiða „skiftivaktir“, ella hava langar arbeiðsdagar
- Fólk, sum hava langt at koyra til og frá arbeiði
- Fólk, við eintáttaðum arbeiði
- Fólk sum brúka ov nógv rúsdrekka

## Arbeiði í skiftivakturm

Ein av størstu trupulleikunum við arbeiði í skiftivaktum er, at tað órógvar okkara innara „kropsklokku“, og hetta viðførir svøvnloysi hjá mongum.

Innara kropsklokkan liggur í einum parti av heilanum, sum eitur hypothalamus. Har frá verður melatonin (eitt kemikale) útloyst um kvøldi fyri at hjálpa kroppinum til at „slappa av“. Melatonin syrgir fyra, at kropshitin og blóðtrystið lækkar, og fyrireikar okkum til, at sovna (Borjigin, Li og Snyder, 1999).

Um morgunin útloysir sama heilasentur cortisol (ið er eitt hormon). Hetta fyrireikar kroppin til dagsins virksemi við t.d. at økja um kropshitan, blóðrensl, og ger okkum meira vakin.

Cortisol er sama hormon, sum kroppurin útloysir, tá vit verða stressað og hava brúk fyri størri ella meira orku, fyri at klára eina avbjóðing.

Við árunum verður innara kropsklokkan meira stirvin, og klárar tí ikki at umstilla seg og venja seg við skiftandi arbeiðstíðirnar eins skjótt, sum arbeiði krevur.

Tí versna svøvntrupulleikarnir hjá fólki vanliga við aldrinum.

Hetta síggja vit í aldursbýtinum á arbeiðsplássum við skiftivaktum. Kanningar í okkara grannalondum vísa, at trupulleikarnir ofta byrja um 45 ára aldur, og serliga eftir 10 ár seinni, um 55 ára aldur.

**Í Kanning, sum var gjørd umborð á føroyskum skipum í 2002, undir leiðslu av Onnu Mariu Simonsen, var aldursbýti fylgjandi:**

| | |
|---|---|
| yngri enn 25 ár | = 3,5% |
| 25 - 35 ár | = 20,7% |
| 35 – 45 ár | = 48,3% |
| 45 - 55 ár | = 17,2% |
| 55 - 65 ár | = 10,3% |

**Í hesum sambandi er tað dokumenterað, at arbeiði í náttarvaktum vísir seg at hava tað mest skaðiligu ávirkanina á heilsuna hjá tí einstaka.**

> 82% av sjómonnum siga seg hava svøvntrupulleikar, tá teir eru umborð, meðan bert 35% merkja trupulleikar, tá teir eru í landi.

Minst 75% av skiftiarbeiðarum stríðast við svøvnórógv. Hetta kemst av, at tey noyðast at arbeiða, meðan kroppurin fyrireikar seg til hvílu.

Tey sum arbeiða í skiftivaktum stríðast eisini oftari við kropsligar trupulleikar, sálartrupuleikar og hava eisini oftari trupulleikar á sosiala økinum. Harumframt hava tey, ið arbeiða í skiftivaktum 4-5 ferðir so ofta trupulleikar við maganum, lýða 1,5 ferðir so nógv av hjarta– og karsjúkur og 80% hava kroniska møði.

Misbrúk er meira vanligt ímillum tey, ið arbeiða í skiftivaktum, í mun til tey, sum ikki arbeiða í skiftivaktum. Harumframt er hjúnaskilnaður meira vanligur hjá teimum, sum arbeiða í skiftivaktum.

## Sjómenn umstilla seg skjótari

Fyri ein persón, sum arbeiðir á sjónum, og hevur eina arbeiðsviku, sum vanliga er 84+ tímar, kann tað skjótt henda, at ein kemur at vera plágaður av kroniskari møði. Tó, Wadsworth et al., (2006) komu eftir, at sjómenn umstilla seg skjótari til skiftivaktir enn fólk á landi. Hesa niðurstøðu gera teir útfrá tí, at máti av møði vaks seinni eftir tí fyrstu vikuna, men tað tók teimum tó eina heila viku at koma rættuliga fyri seg aftur, eftir at teir komu í land. Úrslitið av teirra kanning er ikki óvæntað, tá ein persónur umborð, ikki hevur aðrar faktorar, sum fylgja við sosiala lívinum á landi til at órógva seg. Her verður hugsað um børn, virksemi, ábyrgd í heiminum og nærumhvørvinum v.m.

### Dømi av sjónum:

**Kanning av møði hjá 81 sjómonnum har longsta samanhangandi vaktin var 14 tímar.**

– 16 % av sjómonnunum høvdu verið partur av hendingum ella vanlukkum, sum partvís var orsaka av møði.

– 44 % søgdu, at teir høvdu arbeitt til teir avmaktaðust ella fullu um.

– 41 % høvdu verið úti fyri at sovna, meðan teir stóðu við róðri.

– 43 % høvdu verið so troyttir, at teir sovnaðu á dekkinum, ella í gongini.

*Smith, Allen & Wadsworth's, (2006)*

## Svøvnur er besta amboðið, tá byrgjast skal fyri møði

Fyri at nøkta tørvin hjá kroppinum til viðlíkahald, so muga vit hava djúpan svøvn, helst millum 7-8 tímar svøvn pr. døgn, og hesir tímarnir skulu helst verða samanhangandi.

Kroppurin og serliga heilin, fær ikki tað somu hvildina burturúr 2 x 4 tímar, sum 1 x 8 tímar.

Svøvnurin verður deildur upp í 2 høvuðspartar, Non-REM (non-Rapid Eye Movement) svøvn, har fysisk uppbygging/viðlíkahald hendir. Og REM (Rapid Eye Movement), sum er har uppbyggingin/viðlíkahaldi av heilanum fer fram.

T.v.s. at uppbyggingin av heilanum fyrigongur í svøvnperioduni við Rapid Eye Movement. Eitt tíðarskeið í svøvnsyklusinum, har tað er høgur heilaaktivitetur, og man sær, at tað er rørsla undir eygnalokunum.

Eina vanliga nátt við 8 svøvntímum fara vit ígjøgnum u.l. 5 svøvnsyklus, sum vara um leið 90 minuttir hvør.

Í byrjanini er REM bert 2-5 minuttir av svøvnsyklusinum, restin er Non-REM, men sum náttin gongur, leingist REM svøvnurin, upp til periodur uppá u.l. 25-30 minuttir. Fáa vit ov lítið av svøvni, ella avbrotnan svøvn, so er tað altíð tann kropsligi parturin, sum verður viðlíkahildin fyrst. Arbeiðir tú t.d. í vaktarskifti 6-6, so merkir hettar eisini, at tú aldrin fær samanhangandi 8 tímar svøvn! Helst er hetta orsøkin til, at vit ofta siga, at vit hvílast skjótari aftur, eftir kropsligt virksemi.

## Løgtingslóg nummar 4, partur III, §55 er um hvílutíð

Hendan lógin sigur, at sjómenn hava rætt til 8 tímar hvílu pr. døgn, og at 6 av hesum tímunum skulu verða samanhangandi. Men síðani verður lagt afturat at undantøk kunna verða givin undir serligum umstøðum, tá meirilutin av manningini er einig um hettar! Hesin síðsti setningurin tekur alla styrkina úr lógini. Hóast eg skilji, at vit muga royna at finna eina skipan sum er møgulig at praktisera í vinnunu, so síggi eg hetta eisini sum eina avspegling av væntandi forstáilsi frá landsins síðu, hvussu álvarslig hóttan møði er ímóti trygd, og hvørjar avleiðingar møðin uppá longri sikt hevur fyri heilsuna hjá einstaka arbeiðstakanum.

## Sjófólk hava langar arbeiðsdagar

Í verandi støðu – vita vit ikki – hvussu stórur partur av vanlukkunum í Føroyum henda orsaka av møði.

Tó, tá vit vita, hvussu langar arbeiðsdagar okkara sjófólk hava, og hvussu nógvar dagar tað verður arbeitt, uttan frídagar, so er tað sera væl hugsandi, at møði eisini eigur ein stóran leiklut í vanlukkunum í føroyskari fiskivinnu. Vanlukkur, sum vit vóru sloppin undan, um vit virða tað hóttanina í móti trygdini, sum møði í veruleikanum er.

# Elias Zachariassen



**Føddur 30. juni 1974**

**Børn?**
Unnusta mín, Laura Mary og eg eiga 3 børn, ið eru 9 ár og 6 ár og 0 ár.

**Starv?**
Yvirstýrimaður á Brimili, sum er vaktar og bjargingarskip hjá Vørn.

Vørn er nýggja høvuðsnavnið á samanløgdu stovnunum Fiskiveiðieftirlitinum/MRCC/Tórshavnar Radio/Tilbúgvingarstovninum og Veðurtænastuni. Havi siglt hjá Fiskiveiðieftirlitinum í góð 11 ár, so her er gott at vera.

**Útbúgving?**
10 klassa frá fólkaskúlanum, eftir tað tók eg HF. Havi verið á sjófartsskúla í Svendborg. Bleiv útbúgvin skipsførari á Føroya Sjómansskúla í 2001.

**Hvussu eru útlitini hjá navigatørum?**
Um ein vil fara uttanlands eru útlitini góð. Tað er brúk fyri nógvum góðum navigatørum til at manna tey mongu frálandaskipini, sum eru rundan um okkum. Hjá fiskiflotanum er søgan tann sama, skipini blíva bara færri og færri. Og hýran er kanska ikki tann besta. Hetta ger eisini, at tað eru nógvir navigatørar, sum fara við útlendskum fiskiskipum, serstakliga norskum skipum.

**Hvat er størsta avbjóðingin hjá einum navigatøri í dag?**
Avbjóðingarnar at vera á brúnni eru nógv broyttar tey síðstu árini. Ein navigatørur skal í dag hava góðan teldukunnleika, tí tey tól, sum eru á brúnni og koma á eina brúgv krevja tað. Hevur hann tað so kemur hann langt.

Havi í mínum arbeiði eygleitt, hvussu broytingarnar hava verið hjá fiskiskipum tey seinastu árini. Tey fyrstu árini var ikki tað stóra skili á skipspappírum umborð á nógvum skipum, eitt pappír lá í eini skuffu og eitt annað lá onkra aðrastaðni.

Men her er stór broyting komin í. Nú er meira skil komið á. Nú er alt samlað í eini mappu.

Meini at eitt ættarliðsskifti av navigatørum er farið fram.

Skipararnir eru eisini farnir at hugsa meira um trygd, at verða í bjargingarvesti og hjálmi á dekki o.t.

Vit skulu minnast til at eisini fiskiskip skulu hava regluligar trygdarvenjingar og eisini hava regluligt eftirlit við trygdarútgerð. Hendan ábyrgdin liggur hjá skiparanum.

**Fyrstu ferð til skips?**
Í 1984 við trolbátinum „Hvíthamar".

**Hvørjum skipum hevur tú verið við?**
Topas, Sardis, Stakkur og øðrum.

Havi verið avloysari við strandfaraskipunum: Másanum, Teistanum, Dúgvuni, Sam, Rituni og gomlu Ternuni.

Fekk mær farmasigling við gomlu Norrønu.

**Longsti túrur til skips?**
Í Norðsjónum við Topas, haldi at vit vóru úr Føroyum í 5-6 vikur, landaðu í Danmark.

**Frítíðarítriv?**
Mær dámar væl at vera úti í náttúruni. At vera á floti og vera eftir lunda í Urðini, sum er norðan til á Fugloynni. Men tað hevur ikki verið tað stóra lundafleygi tey síðstu árini.

**Bilur?**
Citroen Berlingo.

**Telda?**
ASUS fartelda.

**Besta bók?**
Ringt at avgera hvat besta bók er, mær dámar væl føroyskar bøkur. Bókin sum eg lesi nú eitur „Søga og Søgn", bókin kom fyrstuferð út í 1933. A Weihe hevur givið hana út. Bókin er uppbygd við stuttum góðum søgum og er skjót at lesa.

Annars eru bøkurnar hjá Niels J Arge eisini góðar.

**Besti sangur?**
„Bert ein dag" .

**Hvat kann gleða teg í gerandisdegnum?**
Tá ið arbeiði gongur sum tað skal, og tá vit hava loyst eina trupla uppgávu í ringum veðri og alt hevur gingið væl. Tá eri eg glaður.

At vera saman við míni kæru.

**Hvat kann øsa teg í dagligdegnum?**
Tá fólk ikki halda tað tey hava lovað.

Eitt mál, sum kann øsa nógv fólk og eisini meg, er málið um CIP og Tollkreditt. Haldi at Kringvarpið má koma víðari.

Um skiparan og maskinmeistaran

Tað er gott at verða góður við maskinmannin.

Sum hin segði: „ikki óttast meistarin svevur".







Fá upp til
32% í avsláttri

Betri pensjón tryggjar tær eina munagóða samanspering, sum leggur lunnar undir eina framhaldandi vælferð, tá ið tú fert frá fyri aldur.

- Vit samanseta pensjón og tryggingar eftir tínum tørvi
- Vit umsita tína pensjón við størsta vinningi fyri eyga
- Umvegis Netpensjón hevur tú fult gjøgnumskygni

Savnar tú tryggingar og pensjón hjá okkum, kanst tú fáa upp til 32% í avsláttri.

Hevur tú spurningar, ella kundi hugsað tær betri frágreiðing, set teg í samband við okkum á 345 700 ella betri@betri.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
Betri pensjón






# Bókin „Føroysk skipasøga“ – ein framsýning

Lat okkum fyrst siga, at hetta ikki er nøkur vanlig bók; hetta er ein bók við nógvum fotomyndum og lítlum teksti. Tað er langt ímillum slíkar útgávur í Føroyum. Og helst er tað tí, at tað ikki er nøkur løtt uppgáva at leggja eina slíka bók til rættis. Tá er kravið sjálvandi, at talan skal vera um serliga góðar myndir. Eru myndirnar ikki góðar, so er so skjótt, at talan ikki verður um eitt gott verk.

Grundarlagið undir bókini er ein framsýning, sum varð í hølunum hjá EIK BANKA í Klaksvík í 2009. Jógvan við Keldu og Jákup Sólstein skipaðu fyri framsýningini, sum var væl vitjað. Tey sum hava tikið myndirnar eru: *Hanna M. Fuglø, Grafia og Norðlýsið.*

## Framsýning við 25 modellskipum

Bókin er *59 blaðsíður* og hvør síða er stór: *29,5 x 29,5 cm.*

Í bókini eru nógvar sjáldsama góðar myndir, men vit mugu eisini siga, at har eru eisini fleiri minni góðar.

Í flestu førum er talan um litmyndir av modellum av elstu fiskiskipum okkara; *sluppir, skonnartir, trolarar og línuskip.* Harumframt eru nakrar myndir, sum eru tiknar av fólki, sum vitjaðu framsýningina.

Tær flestu myndirnar av skipunum eru góðar, men nakrar eru vánaligar, og vit spyrja sjálvandi hví? Tann mest sannlíka svarið er helst, at nakrar myndir eru tiknar við minni góðari fotoútgerð.

Grafia hevur gjørt lay out og prentgerð, og bókin er prentað hjá Estra.

## Ernestina, Verdandi og William Martin

Fyri at lesarin skal síggja, hvussu flottar tær bestu myndirnar eru, hava vit valt at prentað myndir av Ernestinu, Verdandi og William Martin. Vit endurgeva samstundis, hvat er at lesa um hesi trý skipini í bókini. Tað er onki at ivast í, at tey, sum hava tilknýti til sjógvin og tey, sum hava áhuga fyri skipum, tey eiga at ogna sær bókina.

Av tí, at tað eru so nógvar góðar myndir í bókini fara vit her at geva henni eitt gott ummæli og minna á, at bókin er ein góður møguleiki, tá leitað verður eftir eini gávu til ein sjómann.

## Nøkur orð um listamaðurin

Sum nevnt er tað Hans Jacob Fuglø, sum hevur gjørt øll modellini, og lat okkum her siga, at hann telist ímillum okkara frægu listamenn. Tað prógvar framsýningin og bókin. Lat okkum tí eisini siga nøkur orð um listamannin.

Hann er føddur í Klaksvík í 1929. Sum ungur fór hann á Klaksvíkar Sleipistøð at læra skipasmíð, og stóð lærutíðina til hann varð útbúgvin skipasmiðjur. Har arbeiddi hann í fleiri ár, men var eisini til skips inn ímillum.

Hans Jacob Fuglø, hevur gjørt modellini í bókini, sum myndir eru av í bókini Føroysk skipasøga – ein framsýning.




Í sekstiárunum fór hann undir at smíða føroyskar bátar. Her brúkti hann ein bát, sum Jákup Biskupsstøð hevði smíða, sum fyrimynd til hvussu hálsubløðini skuldu gerast. Hann fekk tey gomlu mátini frá Jógvan Glerfoss í Mikladali. Við hesum og uppmátingum legði Hans Jacob seg eftir at smíða føroyskar bátar. Við sínum egna sniði og arbeiðshátti smíðaði hann í eini 25 ár 34 bátar í støddini frá 4-mannafari til 10-mannafør.

Í bókini er yvirlit, sum vísir, at Hans Jacob hevur smíða 34 modellskip.



### Verdandi: KG 389

Slupp, smíðað í Great Yarmounth, Ongland, 1884

**Stødd:** 85,12 tons brutto, 50,53 netto.
**Longd** 77,4 føtur

**Eigarar:** J. F. Kjølbro (til 1928). Skifti síðani eigara nakrar ferðir, seinasti var Símun Simonsen í Heiðunum.

**Kom til Føroya** úr Íslandi 1922. Í november 1944 fór Verdandi av Siglufirði til Reykjavíkar, men kom ongantíð fram. Við vóru 15 mans.

**Ogn:** Edward Fuglø.



### Ernestine: KG 389

**Tveymastra skonnart,** smíðað í Dunkerque, Frakland, 1911

**Stødd:** 194,4 tons brutto, 134,6 netto.
**Longd** 85,5 føtur

**Eigarar:** Brøðurnir Dávur úr Gerðum og J.F. Kjølbro keyptu hana í 1927.

**Fórst á** Suðurlandinum 26. mars 1930. Av 25 monnum sjólótust 9.

**Ogn:** Føroya Fornminnissavn.



### William Martin: TN 131

**Slupp,** smíðað í Rye, Ongland, 1883

**Stødd:** 82,66 tons brutto, 57,23 netto.
Longd 74,2 føtur

**Heimstaðir:** Tórshavn (til 1928)

síðani Rituvík

**Kom til Føroya** úr Lerwick í Hetlandi 1909. Fekk motor í 1930

**Var søkt út** fyri Vátukøllum í Vestmannasundi 1965

**Model nr.** 7/1987

**Ogn:** Føroya Fornminnissavn.

# Eivind eitur nýggja frystilínuskipið í Vágum

**P/F Fossá í Sandavági hevur keypt norska frystilínuskipið Brimøy. Í hesum sambandi hevur P/F Varðin í Gøtu sett partapening í felagið; partapeningurin er nú 1,9 mió. kr. Tá ið báturin er klárur til fiskiskap kemur hann at standa í 22-23. mió. kr.**



Brimøy hevur fingið navnið Eivind, og reiðari er Hálvdan Gudmundsen, sum frammanundan hevur verið reiðari hjá Havbúgvanum, Reynsatindi, Vesturtúgvuni og Venus.

## Venus seldur norskum reiðaríi

Vit hava hitt Hálvdan og hann greiður okkum frá, at tá teir keyptu Brimøy varð Venus samstundis latin norskum reiðaríi. Og hann leggur afturat, at ætlanin er at selja Reynsatind, og samráðingar eru við áhugaði feløg um Reynsatind.

Tá ið teir keyptu Brimøy valdu teir at skifta freon í frystiskipanini. Hetta gjørdi, at teir ikki – alt fyri eitt – kundu fara til fiskiskap við skipinum. Tá hetta var gjørt mettu teir, at teir kundu fara at sigla til fiskiskap á Flemish Kap um miðjan mars, greiður Hálvdan Gudmundsen okkum frá.

## Nógv skip fiska kvotuna á Flemish Kap

Tá vit spyrja, hvussu nógvar túrar teir rokna við at gera á Flemish Kap í ár, greiður hann frá, at samlaða kvotan á Flemish Kap er u.l. 3.330 tons, og leysliga mett svarar hetta til 2.700 tons av frystum fiski. Og tá nógv skip skulu fiska kvotuna metur hann ikki, at tað verða nógv tons í part. Í hesum sambandi kunnu vit nevna, at øll føroysk skip, sum eru í bólki eitt og tvey, fáa loyvi um tey søkja Fiskimálaráðið um fiskiloyvi á Flemish Kap.

Her kunnu vit nevna tey, sum eru ávegis og tey, sum eru til fiskiskap á Flemish Kap: *Vesturleiki, Brestir og Sjagaklettur; hesi skip taka ímillum 270 og 300 tons av frystum.*

Fønix landar til móðurskipið Ran, sum tekur um leið 400 500 tons av frystum. Og so eru tað Kambur, Vágasteinur og nýggi Klakkur. So har eru nógv føroysk skip, sum fiska av kvotuni í ár. Í fjør bar onki til hjá trolarunum, leggur Hálvdan afturat, men í ár vísir tað seg at bera til hjá teimum eisini.

Eivind bygdur í Noregi í 1988

Nýggja skipið er bygt á Solstrand Verft í Noreg í 1988.

Tað er 41,30 metrar langt og 9 metrar breitt.

Skipið lastar 270 tons av frystum fiski. Frystiorkan er u.l. umleið 20 tons um døgnið.

Frystitunlarnir verða brúktar til at frysta stóran fisk og kalva.

Brimøy er útgjørt við Mustad autolínuskipan.

Høvuðsmotorurin er av slagnum ABC 1360 kW. Og hann er niðurblombaður til 749 kW. Tað gevur skipinum eina ferð uppá 10–11 míl við „økonomifart." Við hesi ferð tekur tað umleið eina viku at sigla úr Føroyum til Flemish Kap, greiður Hálvdan frá.

## Flemish Kap, Ísland og Føroyar

Reiðarin greiðir okkum frá, at við hesum skipinum verður lættari at troyta nýggju møguleikarnar á Flemish Kap. Harumframt skal skipið fiska undir Íslandi og undir Føroyum.

Nýggja skipið kemur at fiska íslandskvotuna hjá reiðarínum, sum er tilsamans er 700 tons. Ætlanin er, at skipið skal vera 280 dagar í sjónum.

## Manning av Havbúgvanum

Jan Vang av Norðskála er settur at vera skipari á Eivindi. Hann og øll manningin á nýggja skipinum hevur frammanundan verið við Havbúgvanum. Og tilsamans telur manningin 15 mans.

Nýggja skipið eitur eftir Eivind Gudmundsen, sum er pápi reiðaran. Hann var í mong ár reiðari á Venus, sum nú er seldur til Noregs.

# Nýggjur Klakkur keyptur í Noregi

**Tað eru brøðurnir Líggjas og Bethuel Johannesen í Klaksvík, sum saman við Kósini, hava keypt frystilínuskip í Noregi. Skipið hevur fingið navnið Klakkur. Samstundis fekk gamli Klakkur navnið Núpur. Tað er onki at ivast í, at keypið hevur samband við nýggju møguleikarnar á Flemish Kap. Men 2013 royndist væl hjá gamla Klakki, teir áttu føroyska metið í fjør; veiðan var tilsamans u.l. 1.500 tons.**



## Flemish Kap skal vera ein partur av grunarlagnum

Vit hava hitt Líggjas Johannesen, hann greiður okkum frá, at tað er Sp/F undir Klakki, sum eigur skipið; tað er sama felag sum átti gamla Klakk. Men tað, sum er nýtt er, at nú eigur P/F Kósin helvtina av felagnum, og teir báðir brøðurnir eiga hina helvtina.

Hann nevnir samstundis, at teir vóna at fáa – í minsta lagi – tveir túrar á Flemish Kap. Ein túrur við sigling báðar vegir tekur teimum 5 vikur. Skipið skal fiska fyri millum 20 og 25 mió. kr. um árið fyri at bera seg. Samlaða kvotan hjá Føroyum á Flemish Kap er

umleið 3.300 tons brutto. Tað verða fleiri skipið, sum fara at fiska kvotuna, og fiskað verður til er samlaða kvotan er uppi. So tað verða helst ikki so nógv tons í part.

## Nýggir møguleikar við frystiskipi

Líggjas Johannesen sigur, at skipið er útgjørt við vertikalfrystarum. Á dekkinum er arbeiðsgongdin tann, at fiskurin fyrst verður avhøvdaður ella skráskorin og frystur.

Veiðan verður flutt við flutningsbondum og lyftum. So tað er ikki nógv lyfting umborð.

Líggjas metur, at teir fáa millum 300 og 320 tons í frystilastina.

Lastin á gamla Klakki er 220 rúmmetrar, og á nýggja bátinum er lastin 450 rúmmetrar, so stórur munur er á bátunum.

## Manningin hevur góðar umstøður

Tað eru 16 koyggjur umborð, og fyrsta túrin eru teir tilsamans 15 mans við. Manningin er tann sama, sum var við gamla Klakki.

Yvirmenninir hava einmanskamar og so eru tveymanskømur. Teir rokna við at sama manning verður við túrarnar, sum teir gera á Flemish Kap í ár. Men hetta verður helst broytt seinni í ár. Teir hava kvotu undir Íslandi og vóna eisini at fáa ein túr undir Eysturgrønlandi.

Líggjas Johannesen greiðir okkum frá, at hann fór sín fyrsta túr í 1984 til Ný Foundland. Tað var við Sigurfarinum; teir fóru av Klaksvík í august mánað 1984, og vóru ikki heima aftur fyrr enn til jólar. Tað var tað vanliga hjá skipum, sum tá royndu á Nýfundlandsleiðunum.

## Skipið er í sera góðum standi

Skip er bygt á Solstrand Verft í Noregi, tá fekk tað navnið Urvaag, og var hetta navnið framvegis, tá ið Sp/F undir Klakki yvirtók skipið.

Skipið er 45 metrar langt og 9 metrar breitt.

Høvuðsmotorurin er av slagnum Catepillar 749 kW.

Tað lastar 330 tons av frystum fiski, og frystiorkan er u.l. umleið 16 – 17 tons um døgnið.

Frystitunlellin verður brúkt til at frysta stóran fisk og kalva.

Skipið er útgjørt við eini Mustad autolínuskipan við superbaig. Við hesi skipanini er møguligt at seta nógv skjótari enn við teirri gomlu Mustad skipanini, sum aðrir hava.

Áðrenn farið var at sigla móti Flemish Kap royndu teir egningarmaskinu og línu á føroyaleiðini greiður Líggjas okkum frá í telefonsamrøðu.

# Vit frysta umborð

– Hetta er ein roynd at viga upp ímóti tí lakara prísinum á flaki, sum vit í seinastuni hava fingið. Tað sigur Anfinn Olsen, reiðari og stjóri í Framherja.



Anfinn Olsen reiðari og stjóri í Framherja

Akraberg, sum kom í flotan eftir at reiðaríið hevði selt Vesturvón, frystir umborð heldur enn at flekja, og royndirnar hava higartil verið góðar, sigur reiðarin.

Akraberg legði fyrstu veiðuna, eini 800 tons, upp í Fuglafirði millum jól og nýggjár. Tað mesta endaði hjá Vaðhorni, sum enn er einasta virki, sum hevur neyðugu útgerðina at tiðna fiskin. Síðani eru eini 500 tons landað í Kirkenes og tíðliga í mars verður triðja lastin, helst eini 700 tons, landað í Føroyum.

## Arbeiðsplássini í land

Seinastu árini hava russar keypt nógv skip frá norðmonnum.

– Teir framleiða flak til enska marknaðin, teir hava bæði størri kvotur og bíligari manning enn vit, so kappingin er hørð og nýhugsan má til frá okkara síðu, sigur Anfinn Olsen. Hann leggur ikki í at krógva, at endamálið við at frysta umborð er bíligari rakstur, eitt nú tí manningin verður minni, tá virðisøkingin er í landi. Til ber at siga, at arbeiðsplássini, sum áður hava virðisøkt fiskin umborð, nú verða flutt í land.

– Spurningurin er, hvar tú leggur virðisøkingina, umborð ella í landi. Eg eri eitt sindur í iva, men eg vænti, úrtøkan í síðsta enda er betri, um vit leggja virðisøkingina í landi, sigur Anfinn Olsen. Hann vísir á, at flakamarknaðurin er sera smalur, tí at kalla alt føroyskt flak verður flutt á bretska marknaðin – Fish & Chips marknaðin, sum hann sigur.

## Váði at fáast við

– Tað ger, at hetta er váði at fáast við, ikki minst tá russar eru inni í myndini. Váðin er minni um vit frysta umborð, tí tá fiskurin verður tiðnaður í landið og síðani arbeiddur, kann endaliga produktið eins væl vera saltfiskur sum flak. Seinni vit kunnu taka avgerðina um endaliga produktið, betri er tað, vísir Anfinn Olsen á.

At tað er eitt minni virkað produkt sum kemur í land ger sjálvandi, at prísurin er tað minni. Men kiloini, sum koma til lands, eru fleiri, og tað meinar reiðarin av Toftum vigar væl og virðiliga upp ímóti tí sum fæst minni fyri hvørt kilo.

– Men sjálvandi, tað kunnu vit ikki vita við vissu, fyrr enn vit hava roynt tað. Tíðin má vísa, um hetta er skeivt ella rætt. Hetta er ein satsing, tí tað ber illa til at bakka, og aftur fara at skera umborð, hava vit fyrst gjørt okkum út til at frysta, sigur hann.

## Enn royndir

Anfinn Olsen sigur, at enn er talan í veruleikanum um royndir.

Sumt av tí, sum er landað er við høvdi og sumt uttan høvd. Tíverri hava royndirnar higartil víst, at tað sum er uttan høvd hevur betri góðsku. Fiskurin er hvítari, og tí hava seinnu lastirnar verið uttan høvd.

– Tað er sjálvsagt spell at høvdið fer fyri skeyti, men av tí at talan enn er um royndir, so er ikki vist, at vit ikki við tíðini fáa broytt hetta og gjørt tað betri. Vit noyðast at trilva í eina tíð, áðrenn vit finna rætta leistin. Hetta er ikki bara-bara, vísir Anfinn Olsen á.

Tað sum liggur í kortunum er, at modellið, sum higartil er brúkt í Barentshavinum, eisini verður brúkt aðrastaðni, eitt nú á Flemish Cap.

Tá nøgdirnar av frystum, sum koma uppá land, verða størri, so setur tað eisini krøv til móttøkuorkuna á landi. Til ber at leggja veiðuna upp í einum frystihotelli, sum vit hava fleiri av í Føroyum. Men tá fiskurin skal tiðnast, so má eitt serliga anlegg til tað, so hann verður tiðnaður á rættan hátt og til rætta tíð, so tað passar best til framleiðslugongdina.





# Trolarakreppan eftir seinna heimsbardaga

Búskaparliga høvdu krígsárini, og árini aftaná seinna heimsbardaga, verið føroyska samfelagnum góð. Tað sum sermerkti búskapin eftir seinna heimsbardaga var, at eitt stórt tal av vánaligum kolfýrdum trolarum vóru innfluttir serliga úr Bretlandi til Føroya.

Men í 1948 skifti búskapurin kós. Hetta gjørdist øllum greitt, tá støðan gjørdist spent ímillum manningarfeløgini og Felag Føroyskra Trolaraeigaranna.

Tá ið árið fór at halla kom undan kavi, at í mongum føri høvdu menn, sum høvdu keypt trolarar eftir seinna heimsbardaga verið ósketnir. Tað er um hetta mundið, at útlendingar leggja trolveiðuna um; teir byggja nýggjar oljufýrdar trolarar í staðin fyri teir kolfýrdu, sum vera lagdir.



Á myndini Jóannes Patursson hjá p/f Uvak, ið kom í mai 1947. Hann keypti Kjølbro, tá trupulleikar tóku seg upp í Sjóvinnubankin. Tí verri vóru eisini rímiliga nýggj skip seld av landinum t.d. varð trolarin Nólsoyar Páll hjá Christian Holm Jacobsen seldur til Onglands.

## Veðhald frá løgtinginum

Fyri at bøta um ringu støðuna heitti landsstýri á tingið um at veita veðhald fyri lánum, sum einstøk reiðaravirki máttu taka, fyri at fáa gomul skip klassað. Í fleiri førum vóru reiðarar farnir til Bretlands at klassa gamlar trolarar uttan at vera mentir at gjalda skipasmiðjuni fyri arbeiði. Fleiri føroysk skip lógu í Bretlandi, og sluppu ikki heim, fyrr enn rokningin varð goldin.

Løgtingi gekk landsstýrinum á møti, og samtykti at veðhalda fyri parti av lánum til trolarar, sum vóru klassaðir, men havnaði at veðhalda fyri lán, sum ætlað vóru at gjalda útgerð fyri.

Men onki batti. Við ársenda 1948 kunngjørdi Trolarafelagið, í brævi til manningarfeløgini, at frá jólaaftan 1948 var vinnusteðgur.

Hetta merkti, at teir trolarar, sum lógu inni, sluppu ikki aftur til fiskiskap, og hinir vóru lagdir, so hvørt teir komu inn.

## Skiparalønir skuldu niður í helvt

Skipara– og Navigatørfelagið fekk tvey brøv. Í øðrum brævinum greiddi Trolarafelagið frá, at teir sóu tað sum ómøguligt at halda fram við trolaravinnu við teimum gomlu lønunum, og tí noyddust teir sjálvir at gera hýrutreytir og løgdu við nýggjar lønir fyri skiparar og stýrimenn. Tá ið nevnd felagsins hevði kannað hesar treytir var staðfest, at hetta merkti at lønirnar hjá skiparum og stýrimonnum vildu fara niður í helvt. Nevndin samtykti, at seta lýsing í bløðini har tað varð kunngjørt, at ongin limur mátti mynstra sum skipari ella stýrimaður við trolara eftir øðrum enn seinast galdandi sáttmála.

## Hýru eftir løgtingslóg

Nú hendi tað, at landsstýrið heitti á løgtingið um at samtykkja eina lóg sum ásetti, hvussu lønarviðurskiftini skuldu vera. Henda lóg ásetti, at allir saltfiskasáttmálar frá 1948 framvegis skuldu vera í gildi, meðan fleiri broytingar vórðu gjørdar í ísfiskasáttmálum fyri trolarar.




*Vesturvarðið: Dia á Vertshúsinum førdi Vesturvarða allan seinna heimsbardaga og til 1949, tá hann fór í land.*

Hetta hevði við sær, at menn góvust við ísfiskaveiðu, og so at siga allur trolaraflotin fór á saltfiskaveiðu. Og 1. ársfjórðing 1949 seldu føroysk skip fyri einans 3 mió. kr. í Bretlandi ímóti 8 mió. kr. fyrsta ársfjórðing 1948.

Í brævi til løgtingi skrivaði Trolarafelagið seinni m.a. at tað var ikki við góðum útliti, at trolarar vóru farnir í saltfisk, men kortini vóru skipini farin, tí við ísfiskasáttmálanum, sum løgtingið hevði samtykt vóru ongi líkindi til at fáa nakað burturúr, hóast væl var fiskað. Og tað gjørdi tað ikki betur, at tað vóru teir bestu, størstu og skjótastu trolararnir, sum høvdu nógv tann ringasta sáttmálan, skrivaði Trolarafelagið.

## Fyrsta bankakreppan í Føroyum

Árið 1950 gjørdist eitt vannlukkuár hjá føroyskari fiskivinnu. Nógvur fiskur var spiltur av vánaligum salti, so hann varð ongantíð seldur.

Og tá kríggj brast á í Korea leyp prísurin á koli og salti upp. So nú stóð á kredittinum hjá bæði nýggjum og gomlum skipum. Ein kanning vísti, at fiskiflotin í 1950 hevði 2,7 mió. kr. í rakstrarhalli. Av tí, at Sjóvinnubankin hevði fíggjað ein stóran part av fiskiflotanum, var grundarlagi undir bankanum hótt.

Í hesum sambandi vóru í august mánað 1950, samráðingar við donsku stjórnina um at veita veðhald til Sjóvinnubankanum, til eitt lán uppá 4 mió. kr. Meðan hesar samráðingar vóru í Keypmannahavn varð ein frágreiðing, frá danska bankaeftirlitinum, almannakunngjørd. Bankaeftirlitið metti, at Sjóvinnubankin hevði mist sín tiltakspening, og at hann mátti fáa nýggjan pening. Hetta var gjørt í september 1951.

Løgtingið veitti innskotskapital, sum staturin garanteraðið, og Fiskasølan, Tryggingarsambandið og einstaklingar settu 1,2 mió. kr. í nýggj partabrøv. Soleiðis kom partapeningurin upp á. 1,5 mió. kr. - og fyrra bankakreppan – var avhæsað.

## Onnur bankakreppan

Men í februar 1952 var støðan aftur so vánalig í Sjóvinnubankanum, at hann mátti endurreisast. Nú settu Fiskasølan og Tryggingarsambandið hvør sínar 250.000 kr. í, og tann gamli partapeningurin var niðurskrivaður til 15.000 kr. Skipafelagið Føroyar átti 20.000 kr. av tí upprunaliga partapeninginum, sum var 300.000 kr. Nú var luturin hjá Skipafelagnum skrivaður niður til 20 kr.

Í sambandi við bankakreppuna noyddist p/f Uvak av selja Jóannes Patursson, sum var ein av nýggjastu trolarunum í landinum. Hesin trolarin var millum manna vanliga nevndur Bóndin. Skiparin Hans Pauli Johannesen sigur í endurminningum sínum, at í 1951 var hann skipari á Bóndanum og, at hann minnist, at hann fekk telegramm frá Kjølbro, at nú hevði hann keypt Bóndan. Tað sum var heppið í hesum føri, var at Bóndin ikki var seldur av landinum, hann skifti bara frá TN til KG.

## Klippfiskur, sild og Grønland

Nú vóru nógv skip seld ella løgd, og stórt arbeiðsloysið tók seg upp. Í øllum høttafallinum kom tað væl við, at føroyingar longu vóru farnir undir aftur at virka klippfisk til londini í Suðurevropa og Brasilia.

Tað bøtti eisini um stoytin, at sildafiskiskapur tók seg upp norðanfyri Føroyar. Hann bjargaði mangari slupp og nøkrum koltrolarum. Men hetta vóru ongi berandi vinnutól til ta kapping, sum vantast kundi frá væl útgjørdum fiskiflotum í grannalondunum um alt Norðuratlantshav.

Um hetta mundi varð nýggjur sáttmáli gjørdur um rættindi í Grønlandi, sum vóru nógv rúmari, enn tey høvdu verið fyri annan heimsbardaga, og føroyingar bygdu nú saman við norðmonnum og dønum eina rættiliga støð í Føroyingahavnini undir heitinum Nordafar.

Norðmenn og danir vóru í 1949 farnir undir byggingar longur inni í firðinum, har upprunaliga Føroyingahavnin var. Í fyrstu syftu ætlaðu føroyingar sær at varðveita og útbyggja gomlu Føroyingahavnina, men í 1953 fóru teir upp í samarbeiði við norðmenn og danir.

Føroyski parturin í hesum arbeiði var lutafelagið Grønlandsfelagið, har Skipara– og Navigatørfelagið var ein lutaeigari saman við øðrum vinnufeløgum og løgtinginum. Nú fóru føroyskir útróðrarmenn í stórum tali til Grønlands at rógva út, eins og føroyski fiskiflotin fór at royna meira undir Grønlandi.

Í Sjóvinnubankanum gekk tað soleiðis, at tann gamli partapeningurin – sum frá leið – varð skrivaður upp aftur, og í 1972 høvdu tey upprunaligu partabrøvini hjá Skipara– og Navigatørfelagnum upp á 20.000 kr. fingið fult virðið aftur.



Maskinistur | Maskinmeistari | Skipari | Skipsførari



Spennandi og fjølbroyttar útbúgvingar

og eitt hav av eftirútbúgvingarmøguleikum

Dømi um skeið:

1 ARPA skeið
ARPA Automatic Radar Plotting Aids

2 GOC (Generelt og endurnýggjan)
GOC General Operator Certificate (NEW)

3 Tankers Safety serskeið fyri oljugas- og kemikaliutangakip
Tankers Safety, special course for oil-, gas- and chemical tankers

4 Flutningur av vandamiklum farmi
Transport of dangerous goods in dry cargo ships

5 Eftirútbúgving sum sjúkraviðgeri (Heilsulæra)
Supplementary training in medical proficiency

6 ECDIS (elektroniskt sjókort)
Course in Elektronic Cart Display Indication System

7 SSO-skeið
Course for Ship Security Officers

8 Fult trygdarskeið fyri sjómenn. STCW A-VI/1-1,A-VI/1-2, A-VI/1-3,A-VI/1-4
Basic safety training

9 Bátaføraraskeið. STCW A-VI/2-1
Proficiensy in Servival Craft and Rescue boats

10 Bridge Resource Management
Bridge Resource Management

*Set teg í samband við skúlan og hoyr nærri.*

KREA

Nóatún 7 · FO-100 Tórshavn
Tel 350 250 · Faks 350 251
info@vh.fo · www.vh.fo

VINNUHÁSKÚLIN
CENTRE OF MARITIME STUDIES & ENGINEERING

Vinnuháskúlin er ein nútímans skúli við serkønum lærarum í øllum lærugreinum, eins og skúlin hevur allar teir hentleikar og útbúnað, sum skulu til fyri at gera útbúgvingina áhugaverda og góða. Útbúgvingarnar á Vinnuháskúlanum eru góðkendar av Føroya Landsstýri, Søfartsstyrelsen og IMO.

BROT ÚR DAGBÓK



# Tíðindi frá Maskinmeistarafelagnum:

**20-11-13 MF**
Samráðingarfundur nr. 7 millum KAF og MF um nýggjan sáttmála fyri SEV. Av tí, at trupulleiki er við at varðveita felags lønartalvu fyri SEV og alment settar, var umboð fyri Lønardeildina við á hesum fundi. Nógv bleiv tosað og rokna fyri at finna eina loysn so felagslønartalvan kundi varðveitast.

**20-11-13 S&K**
P/F Fakfelag hevði fund við ráðgevara um endaligan fíggjarleist til keyp av Lív.

**22-11-13 Runavík**
Fyrsti fundur við reiðaríini Frakt og Sand, Sandgrevstur og Sekstant um nýggjan felags sáttmála fyri reiðaríini.
Tosað bleiv generelt um sáttmálan, uttan at nøkur sáttmálakrøv blivu framløgd.

**25-11-13 MF**
Partarnir blivu samdir um framyvir, at hava tvær lønartalvur eina fyri SEV og síðan tað fyri alment lønt. Eisini var semja um at farast skuldi undir at skriva endaligu semju.

**27-11-13 Portugálið**
Fundur í Sjóvinnuráðnum um kæru, sum MF hevur reist um manningarskjal.
MF legði fram síni sjónarmið í málinum, eingin avgerð varð tikin á fundinum, men semja varð um at biðja um fleiri upplýsingar.

**29-11-13 MF**
Tosað bleiv um semjuna millum MF og FMA í sáttmálanum hjá alment løntum, Magnus Heinason og Vørn. Partarnir vóru samdur um at sáttmálarnir fyri Magnus, alment løntum kundi gerast klárir til undirskrivingar. Men fyri Vørn eru nøkur viðurskifti, sum tað tykist vera trupult at fáa avgreidd,

**18-12-13 Als-húsið**
Stýrisfundur í Trygdargrunninum har millum annað fíggjarætlan fyri 2014 og ávegis grannskoðan fyri 2013 vóru viðgjørd.
Seinnapartin var stuttur fundur millum manningarfeløgini og Reiðarafelagið fyri farmaskip um eftirløn.

**07-01-14 MF**
Fundur við advokatin hjá felagnum, á skránnið vóru ymisk mál, sjópantikrøv, skeivar avrokningar og nøkur persónsmál.

**09-01-14 Vinnuhúsið**
Fundir við Føroya Reiðarafelag fyri fiskiskip, har allar avtalur, sum gingu út við ársskiftið blivu framlongdar árið 2014 út, so allir sáttmálar ganga út samstundis. Eisini bleiv fyrsta stigið tikið til at seta ein arbeiðsbólk at endurskoða allar felagsreglur. Seinnapartin FSN.
Fyrsti blaðfundur í 2014. Eftirmeting av síðsta blaðið og skrá til komandi blað bleiv viðgjørd.

**15-01-14 Portugálið**

**17-01-14 Mentamálaráðið**
Nýggja Maritima Útbúgvingarráðið hevði sín fyrsta fund saman við mentamálaráðharranum. Ein sera góður fundur hvar menn tosaðu um tað komandi nevndararbeiði – fleiri hugskot komu uppá venda.

**21-01-14 Fíggjarmálaráðið**
Fundur um broytingar av tænastumannalógini, lógaruppskotið varð sent út til hoyringar í fjør til tey fakfeløgini, sum hava samráðingarrættin fyri tænastumenn. A fundinum bleiv lógaruppskotið gjøgnumgingið og feløgini kundu koma við sínum viðmerkingum.

**22-01-14 MF**
Fundur á skrivstovuni millum starvsfólkaleiðarin hjá SEV og MF um tiltak 60+.
Tiltakið snýr seg um at halda ein 60+ dag har øll starvsfólk hjá SEV omanfyri 60 møtast at tosa um framtíðina sum pensionistar, sera gott hugskot sum SEV her kemur við.

**23-01-14 Fiskimannafelagið**
Fyrrapartin: Óformellir fundur millum manningarfeløgini og Felagið Línuskip, um frystisáttmála nú fleiri frystilínuskip koma inn í flotan.
Seinnapartin: Blaðfundur, Mið og Magn, har tosað bleiv um blaðútgávu generelt og greinar til komandi blað og onnur bløð.

**24-01-14 Vinnuháskúlin**
Prógvhandan hjá Maskinmeistaranum, skipsføraranum og Skiparum. Røður blivu hildnar prógv og gávur handaðar. Nógv fólk var til staðar, ein sera góð og hugnalig løta. Seinnapartin: Nevndarfundur. Kunnað bleiv um fýra mál, m.a. LÍV, fiskisáttmálan og Føroyskar maskinmeistara í Norra og teirra rættindi
Tólv mál vóru til støðutakan. Millum annað sáttmálasamráðingar við Farmaskip undir 3000KW. Endaligar samráðingar fyri SSL og Vørn og manglandi manningarskjøl fyri teir nýggju línubátarnar, sum nú koma til landið.

**27-01-14 Kaffihúsið**
Manningarfeløgini hildu fund saman við sjófólki frá Team Beredskab. Fleiri evnir vóru uppi at venda millum annað eftirlønarviðurskifti, sáttmálaviðurskifti, semja var um at møtast eina ferð árliga í jan-feb at tosa um sáttmálaviðurskifti og upplegg til sáttmálasamráðingar.

**28-01-14 FF**
Manningarfeløgini hildu fund við reiðaran og sakføraran hjá Grunnabar um ógreið lønarviðurskifti í 2013. Semja var um at kanna hetta nærri og so møtast aftur.

**31-02-14 FF**
Grunnabar. Manningarfeløgini og South Pelagis samdust um at lata sáttmálan frá í fjør galda hetta árið út uttan broytingar.
Samstundis gekk reiðaríið undir krav og um at fáa øll viðurskifti í rættlag, sum stríð hevur staðist um í 2013.

**03-02-14 FF**
Óformellur fundur við landsstýrismannin Jacob Vestergaard um makrelfiskiskap og útlendingar við føroyskum fiskiskipum, og sáttmálaviðurskifti hjá útlendingum.

**Dagarnir 4-5-6/02-14 Álborg**
Fundur millum Polar Seefood og Maskinmeistarafelagið í Álborg. Fundurin snúði seg um at fáa ein sáttmála fyri Polar Princess, tá hon fiskar uppsjóvarfisk, heilfrystur og flakaveiðu. Vit høvdu avsett tveir dagar til hetta arbeiðið, men vóru lidnir eftir hálvum øðrum degi. Fundur var eisini við teir maskinmeistararnar, sum vóru hjá skipinum. Stórt sæð kann man siga, at avtalan fylgir teimum føroysku sáttmálunum. Sáttmálin blívur lagdur til støðutakan á komandi nevndarfundi.

**07-02-14 FSN**
Blaðfundur: Kannað varð eftir, hvussu langt man er komin við blaðgreinum til komandi blað, vir vóru noyddir at redigerað nakað.

**14-02-14 MF**
**Fyrrapartin SSL:**
Tvey leiðsluamboð vóru møtt til hendan fundin, har teir framløgdu arbeiðsætlanir fyri skipini hjá SSL fram til 2016. Eisini bleiv tosað um reglugerðir millum annað reglugerð um summarfrí og avspákan. Nevndin fer at kanna arbeiðsætlaninar nærri og taka støðu á nevndarfundi tann 21-01-14.
Stjórin møtti eisini á hesum fundi fyri at heilsa uppá.

**Seinnapartin –nevndarfundur:**
Høvuðsmálið á hesum fundi var støðutakan til sáttmálan við Polar Seefood. Nevndin mælti til nakrar smávegis broytingar áðrenn undirskrivað blívur. Kunnað bleiv eisini um fundin fyrrapartin við SSL.

**Sjóvinnustýrið**
Man kann til tíðir ivast í málsviðgerðini hjá hesum stýri. Vit hava dømi um, at undantaksloyvi er givið til útlending, meðan tað verður kannað hvørja útbúgving og vinnubrøv viðkomandi hevur. Ongin kunning er t.d. givin um søkt hevur verið eftir skikkaðum maskinmeistara.
Her fylgir sjóvinnufyrisitingin ikki vanligari siðvenju, og fylgir heldur ikki síni egnu reglugerð, sum liggur á teirra egnu heimasíðu.
Tað kann tykjast sum um sjóvinnufyrisitingin til tíðir leggur størri dent á at fáa skip manna enn at hugsa um trygdina umborð, sum skuldi verið teirra høvuðsendamál.
Við ársskifti boðaði landsstýrismaðurin John Dahl frá, at stjórin í sjóvinnustýrinum varð settur fyribilsstjóri á SSL.
Hettar var ein sera óheppin setan; báðir skuldi vitað betur.
Tað er eisini skeivt, at landsstýrismaðurin bæði hevur „reiðarakaskett“, og samstundis hevur Sjóvinnustýrið undir sær. SSL og Sjóvinnustýrið hoyra ikki heima hjá sama landsstýrismanni, og tað hevur eisini verið atskild áður. Álitið á Sjóvinnustýrið viknar við slíkum avgerðum.

## Aðalfundurin 2014

**Ársaðalfundurin hjá Maskinmeistarafelagnum verður hildin 8. mars kl. 14 á Parnassinum, Hotel Hafnia**

Skráin er sambært lógini hendan:
**1.** Val av fundarstjóra.
**2.** Frágreiðing formansins.
**3.** Leggja fram roknskap til góðkenningar.
**4.** Uppskot um lógarbroytingar.
**5.** Val av nevndarlimum og tiltakslimum.
**6.** Ásetan av limagjøldum.
**7.** Velja skrásettan grannskoðara.
**8.** Ymiskt.

Aftaná aðalfundin verður smyrjibreyð og okkurt drekkandi at fáa.
Møgulig uppskot at leggja fyri aðalfundin skulu vera nevndini í hendi í seinasta lagi 14 dagar undan aðalfundinum.

Limir kunnu koma á skrivstovuna at kunna seg um roknskap og møgulig uppskot at leggja fyri aðalfundin teir seinastu 14 dagarnar áðrenn fundin.
Jóan Petur Patursson og John Højsted hava innan 15. desember 2013 boðað frá, at teir stilla upp til nevndarval.

*Limir, sum ikki kunnu møta á aðalfundinum, kunnu koma á skrivstovuna at velja við brævatkvøðu.*



# Tíðindi frá Skipara– og Navigatørfelagnum:

**27-11-13** **Portugálið**
Sjóvinnuráðið viðgerð kæru um manningarásetan á M/S Havsund, málið er ikki nóg væl lýst. Ráðið skal hittast seinni til at taka støðu til kæruna.

**2-6/ 12-13** **Vinnuháskúlin**
Formaðurin er á skeiði til at endurnýggja vinnubrævið. Nýggju mans eru á skeiði. Fyri tað mesta er talan um menn, sum hava verið við fiskiskipum í mong ár ella í starvi á landi.

**11-12-13** **Fiskimálaráðið**
Fiskivinnuráðið viðgerð kunngerð um at skipa gullaksaveiðuna við kvotum til einstøku skipini. Eisini er kunngerð um skipan á veiðu á NAFO økinum.

**18-12-13** **ALS**
Stýrið í Trygdargrunninum tosar saman um at grunnurin hevur akuttan tørv á nýggjari KT skipan. Fíggjarætlan verður løgd fyri 2014, stýrið væntar nøkulunda somu gongd sum í 2013.

**20-12-13** **FSN**
Nevndarfundur: seinastu fyrireikingarnar til aðalfundin millum annað gjøgnumgongd av roknskapinum, sum vísir eitt avlop á 722 tús. kr. Ogn felagsins er nú knapt 15 mió. FSN húsið hevði fingið nakað av vindskaða. Tekjan á kvistinum var loysnað og nakað av vatnskaða var í einum arkivrúmi.

**28-12-13** **Hotel Føroyar**
Aðalfundur hjá FSN, uppmøtingin er góð og limirnir hava nógv ymiskt uppá hjarta. Bæði rós og rís verður givið formanni og nevnd. Fleiri bjóða seg fram sum nevndarlimir, nývaldir í nevndina eru Kristen Friis, skipari á Fram og Elias Zachariassen, yvirstýrimaður á Brimli. Eftir fundin skipaði nevndin seg, formaðurin heldur fram, nýggjur næstformaður er Annfinnur Garðalíð.

**09-01-14** **FSN**
Nevndarfundur: Vit tosa saman um, hvussu arbeiðið skal skipast nú felagið hevur fingið nýggjan næstformanni. Fyrrverandi næstformaðurin Regin Nónstein arbeiddi partvíst á skrivstovuni og hevði ábyrgd av fíggjarviðurskiftum, so sum roknskapi og bókhaldi. Regin ger framvegis onkrar uppgávur fyri okkum.

**15-01-14** **Portugáli**
Sjóvinnuráðið tekur støðu í kæru frá Maskinmeistarafelagnum um manningar- ásetan á M/S Havsund. Teir fáa ikki viðhald í kæruni, umboðið hjá Fiskimannafelagnum atkvøður saman við formanninum og reiðarunum.

**17-01-14** **Mentamálaráðið**
Maritima útbúgvingarráðið er endurstovnað eftir, at onki virksemi hevur verið í eitt gott ár. Nýggjur formaður er Alfred Petersen. Bjørn Kalsø kunnar ráðið um hvørjar hugsanir hann hevur um útbúgving av sjófólki.

**24-01-14** **Vinnuháskúlin**
48 næmingar fáa prógv, høllin er fullsett og sannur hátíðardámur er yvir løtuni. Torbjørn Jacobsen heldur eina snildisliga røðu, har hann skiftir í millum sjóferðina hjá Oddyseus og umstøðurnar hjá føroyska sjómanninum.

**27-01-14** **Kaffihúsið**
Manningarfeløgini hava fund við manningarnar hjá Team Beredskab. Nýggja eftirlønarskipanin verður umrødd. Eftirlønaruppsparingin hevur verið sjálvboðin hjá limum okkara í FAS. Nú skulu 8 % av lønini sparast upp. Fleiri ynskja eitt skotbrá fyri at fáa hetta uppá pláss. Onnur mál vóru eisini umrødd, so sum føroyska lønarlagi í mun til líknandi skip undir norskum flaggi. Seinni verður eisini fundur fyri teimum, sum vóru umborð, tá fundurin varð hildin.



**Nevndarlimir í Skipara- og Navigatørfelagnum á aðalfundi 28. Desember 2013:**

**Á myndini fremst til vinstru:** *Kristen Friis, Leivur Christiansen, Annfinn Garðalíð næstformaður og Eyðstein Djurhuus formaður.*

**Ovast frá vinstru:** *Leif Joensen, Elias Zachariasen, Ellintur M. Abrahamsen og Gulak Gulaksen.*

**Nevnarlimir, sum ikki eru á myndini:** *Dan Ingi Andreasen, Ólavur Biskupstøð, Andrias V. Højgaard.*

**Nývaldir í nevndina eru** *Kristen Friis, skipari á Fram og Elias Zachariassen, yvirstýrimaður á Brimli. Mynd av Elias Zachariassen er á forsíðuni.*

**29. og 30/ 01-14** **Bergen**
Navigatør Kongress og Trygdarseminar. Komandi reglur um sigling í ísi fekk nógva umrøðu. Majbritt Pauladóttir umboðaði Sjóvinnustýrið á trygdarseminarinum.

**03-02-14** **FF**
Manningarfeløgini hitta Jacob Vestergaard til at tosa saman um, hvussu vit sum frægast finna eina skipan fyri útlendskar fiskimenn umborð á skipum, sum royna við Føroyar.

**04-02-14** **Fiskimálaráðið**
Fiskivinnuráðið viðgerð lógaruppskot um nýtt Havrannsóknarskip.

**07-02-14** **FSN**
Nevndarfundur: Áshild Joensen skrivstovu kvinna hjá FSN fekk handaða gávu, hon fylti 50 ár dagin fyri fundin. Gávan var ein figurur og ein skál úr glasi, sum Mikkalina Norberg listakvinna hevur evnað til. Áshild hevur starvast hjá okkum í 17 ár.

**10-02-14** **FSN**
Fundur við Dánjal Jákup Meinhartson frá Antares og Magna Laksafoss granskara. FSN og Antares skulu gera eitt framhald av granskingarverkætlan frá 2009 um ávirkanina á okkara búskap frá inntøkum frá útisiglarum. FAS skipanin verður partur av kanningin. Vit deilast um kostnaðin av hesum.

**18-02-14** **Fiskimálaráðið**
Fiskivinnuráðið viðgerð kunngerð um skipan av veiði hjá føroyskum skipum í Grønlendskum sjógvi í 2014.

**20-02-14** **Vinnuháskúlin**
Maritima Útbúgvingarráðið hevur fund.

## Skipara- og Navigatørfelagið

| | | |
|---|---|---|
| Árni Hansen | 06-02-1944 | 70 ár |
| Hans M. Lydersen | 08-01-1954 | 60 ár |
| Dánial Jákup Jørgensen | 09-01-1954 | 60 ár |
| Dánjal Petur Hansen | 13-03-1954 | 60 ár |
| Gudmund Danberg | 17-03-1954 | 60 ár |
| Leif Joensen | 23-01-1964 | 50 ár |
| Herjolvur Tausen | 19-03-1964 | 50 ár |
| Casper Christensen | 01-01-1974 | 40 ár |
| Hans Jacobsen | 02-01-1974 | 40 ár |
| Sámal Henriksen | 07-01-1974 | 40 ár |
| Mads Kári W. Olsen | 07-02-1974 | 40 ár |
| Óli J. Andreasen | 08-02-1974 | 40 ár |
| Jóhan Petur Johannesen | 05-03-1974 | 40 ár |
| John Ryan | 16-03-1974 | 40 ár |
| Líggjas Blábjørg | 19-03-1974 | 40 ár |
| Elmar Debes Petersen | 23-03-1974 | 40 ár |
| Jákup Hansen | 03-01-1984 | 30 ár |
| Ragnar Groth Mortensen | 08-01-1984 | 30 ár |
| Helgi Hansen | 24-01-1984 | 30 ár |
| Rói Matras Absalonsen | 27-01-1984 | 30 ár |



**Jóann av Reyni** hevði 70 ár føðingardag 19. februar í ár. Vit ynskja honum hjartaliga tillukku við føðingardegnum.

Jóann hevur í mong ár starvast á Brennistøðini á Hjalla.

## Maskinmeistarafelagið

| | | |
|---|---|---|
| Jóann av Reyni | 19-02-1944 | 70 ár |
| Regin Djurhuus | 30-03-1944 | 70 ár |
| Sámal Johannesen | 31-03-1944 | 70 ár |
| Árni Johansen | 16-01-1954 | 60 ár |
| Finnbogi Nielsen | 25-02-1954 | 60 ár |
| Óli Frederiksberg | 22-01-1964 | 50 ár |
| Sofus Johannesen | 26-03-1964 | 50 ár |
| Marni Zachariasen | 28-03-1964 | 50 ár |
| Hans Jacobsen | 02-01-1974 | 40 ár |
| Mannbjørn Joensen | 26-02-1974 | 40 ár |
| Edvard á Hólalagnum | 18-03-1974 | 40 ár |



TÍN TRYGD
- ER TÍN ÁBYRGD!

Eru landgonguviðurskiftini trygg ?
Nýtir tú persónliga trygdarútgerð ?
Er bjargingarútgerðin tøk og í lagi ?
Halda tit bjargingar- og brandvenjingar regluliga?
Yvirheldur tú kravdu hvílutíðina ?

- eisini vit vilja,
at tú ert trygg/-ur!

SJÓVINNUSTÝRIÐ
FAROESE MARITIME AUTHORITY

Sjóvinnustýrið . Inni á Støð 22 . Postrúm 28 . 370 Miðvágur . Tlf 35 56 00 . Fax 35 56 01 . Teldupostur fma@fma.fo . Heimasíða www.fma.fo

# Hátíðarhald og prógvhandan í Vinnuháskúlanum

Tað, sum setti dám á hátíðarhaldið og prógvhandanina í Vinnuháskúlanum 24. januar í ár var, at hetta var fyrstu ferð nýggi skúlastjórin, Wilhelm E. Petersen, handaði teimum lesandi prógvini – tey vóru 47 í tali.



Wilhelm E. Petersen skúlastjóri.



**Í gestarøðu síni tók Torbjørn Jacobsen m.a. soleiðis til:**
Gamalt var, tá ið togan tók seg upp ímillum fólk, at tað var sum ímillum skipara og kokk. Ofta kundi tað vera líka kaldligt ímillum skiparar og maskinstjórar. Tess meiri knúturin setti seg, læstist, tað púrgjørdari gjørdust argumentini, og onkuntíð kundi endabresturin vera, at skiparin segði sína stætt at hava verið til síðani tað fyrsta vindblaki á Klótuni, meðan maskinmenninir vóru reinar novisur í váta elementinum, sjálvsagt, tí motorurin í tíðarmáli er ein hvølpur aftur ímóti navigatiónini. Tað er rætt, kulturarnir vóru rættiliga ymiskir, og tað av góðum grundum. Navigatørarnir høvdu fingið sína verkligu uppaling í fleiri ár á skipsdekki, langir túrar, og ofta vóru viðurskiftini ikki serliga mannsømilig, í hvussu er í mun til tað, sum nú er gerandiskostur.



Skipsførarin Eyðun Antoniussen, høgrumegin, hevði hægsta miðal próvtal hjá Navigatørunum. Í hesum sambandi handaði Eyðstein Djurhuus, vegna Skipara– og Navigatørfelagið, honum virðisløn.



Skiparar:

Jóannis Joensen
Jákup Johansen
Siggert Johansen
Janus Ortind
Allan Hvalsrætt
Jógvan Edvard L. Joensen
Benjamin Nielsen

Jónfinn L. Poulsen
Bergur Jacobsen
Jónleif S. Davidsen
Dan D. Clementsen
Kári G. Danielsen
Fríði Gullbein
Leviv Jacobsen

Hans Jørgen K. Ellingsgaard
Michael Borgardal
Hildibrandur Olsen
Signar Petersen
Høgni Vesturdal



Skipsførarar:

Petur Hans H. Winther
Ísakur Petersen
Ólavur Danielsen
Ingi Kerlok
Karl Eli Samuelsen

Eyðun Anthoniussen
Johan Eli F. L. Poulsen
Elith Godtfred
Jógvan T. Johannesen
Dánial H. Poulsen

Jógvan Olsen
Absalon B. Poulsen
Jóan Pauli S. Eyðsteinsson
Antenes M. Joensen

# Virðislønir:

## Maskinmeistarar:

**Albert Annfinnsson**, fototól frá Suðuroya Sparikassa

**Jóannes Simonsen**, mátitól frá Maskinmeistarafelagnum

**Sjúrður L. Petersen**, lummaur frá Áhugafelagnum Antares

**Rúni E. Elttør**, gullur frá A. P. Møller.

## Skipsførarar:

**Eyðun Anthoniussen**, gull ur frá A. P. Møller

**Karl Eli Samuelsen**, klokkusett frá Tryggingarfelagnum Føroyar

**Ísak Petersen**, lummaur frá Antares

**Johan Eli L. Poulsen**, ur, kvív og pennasett frá Søfartens Ledere

## Skiparar:

**Janus Ortind og Signar Petersen**, kikara frá P/F Thor

**Jákup Johansen**, barometur og klokkusett frá Faroe Agency

**Hans Jørgen K. Ellensgaard**, barometur og klokka frá Faroe Ship

**Benjamin Nielsen**, lummaur frá Áhugafelagagnum Antares.

Harumframt varð virðisløn latin **Eyðun Anthoniussen** fyri hægsta miðal próvtal hjá Navigatørunum. Tað var Skipara- og Navigatørfelagnum, sum læt hesa virðisløn.



Maskinmeistarar:

Dánial G. Nolsø
Beinir Danielsen
Sjúrður L. Petersen
Høgni J. Zachariassen
Albert Annfinnsson

Rúni E. Elttør
Fríðálvur Múller
Atli Henriksen
Petur T. Joensen
Flóvin í Ólavstovu

Uni Mortensen
John Klein Olsen
Jóannes Simonsen
Allan J. F. Andreasen

# Tín eftirløn tryggjar tær eitt virðiligt LÍV

Hóast tú í gerandisdegnum ikki hugsar um eftirløn og tryggingar, so hevur hetta stóran týdning fyri teg.

Rætta eftirlønarskipanin, trygging við óarbeiðsføri og ein lívstrygging lættir tær um tilveruna, tá tú leggur frá tær, tryggjar tær eitt virðiligt lív, um tú missir førleikan, og tryggjar tey, ið sita eftir, um tú leggur árarnar inn ov tíðliga.

LÍV er Føroya elsta og størsta eftirlønar- og lívstryggingarfelag við yvir 22.000 eftirlønaravtalum. Við einum starvsfólkaliði við drúgvum royndum og hægstu útbúgvingum og serfrøði á økinum tryggja vit kundum okkara eina trygga eftirløn og munagóðar tryggingar í einum samhaldsføstum felagi.

Samstundis ger støddin okkum før fyri at umsita íløgurnar uttan dýrkandi millumlið. Hetta gevur hægri avkast og lægri umsitingargjøld.

**– Trygg eftirløn**

ekka.fo